# Løgmansskrivstovan

**Løgtingið**

Dagfesting: 30.05.2016
Mál nr.: 0617-001/16
Málsviðgjørt: NF/Lógartænastan

**Løgtingsmál nr. xx/2016: Uppskot til løgtingslóg um tilhald, uppihaldsforboð og burturvísing (Tilhaldslógin)**

## Løgtingslóg
## um
## tilhald, uppihaldsforboð og burturvísing
## (Tilhaldslógin)

### Kapittul 1
*Tilhald og uppihaldsforboð*

**§ 1.** Við tilhaldi kann ein persónur fáa forboð fyri at leita upp ein annan persón fysiskt, munnligt ella skrivligt, herundir gjøgnum elektroniskt samskifti, ella á annan hátt at seta seg í samband við ella at elta viðkomandi.

**§ 2.** Tilhald kann verða givið, um
1) grundaður illgruni er um, at ein persónur
    a) hevur volt øðrum persóni ónáðir við at forfylgja ella órógva hann, soleiðis sum nevnt er í § 1, ella
    b) hann ímóti hesum persóni hevur gjørt annað revsivert, sum kann javnmetast við ónáðir, og
2) ávísar orsøkir eru at halda, at hann framhaldandi fer at volda hinum ónáðir, soleiðis sum nevnt er í nr. 1.

*Stk. 2.* Tilhald kann eisini verða givið, tá ið
1) grundaður illgruni er um, at ein persónur hevur brotið ella roynt at brotið eina av ásetingunum í revsilógini um dráp, rán, frælsisskerjing, harðskap, eldáseting, neyðtøku ella annað kynsligt brotsverk, og
2) tann órættaði ella hansara nærmastu orsakað av grovleikanum á lógarbrotinum ikki eiga at skulu finna seg í at hava samband við viðkomandi, soleiðis sum nevnt er í § 1.

*Stk. 3.* Tilhald kann eisini verða givið, um ein persónur við rímiligari grund er undir illgruna fyri at hava brotið ella roynt at brotið áseting í revsilógini um ólógligan tvingsil við at noyða annan til hjúnalag ella átrúnaðarliga vígslu, sum ikki hevur borgarligt gildi. Fútin kann taka avgerð um tilhald út frá 1. pkt, óansæð treytirnar í § 14.

**§ 3.** Við uppihaldsforboði kann ein persónur fáa forboð fyri at uppihalda seg ella ferðast á einum nærri tilskilaðum øki nærindis bústaði, arbeiðsstaði,

útbúgvingarstaði ella tilhaldsstaði hjá øðrum persóni ella nærindis øðrum staði, har tann órættaði ofta ferðast.

**§ 4.** Uppihaldsforboð kann verða givið, tá ið treytirnar um tilhald sambært § 2 eru loknar, um so er, at

1) illgrunin viðvíkir ofta endurtiknum broti á § 2, stk. 1, nr. 1, tilætlaðum broti á tilhald sambært § 1 ella einum lógarbroti, sum er fevnt av § 2, stk. 2 ella 3, ella av § 8, nr. 1, og

2) tilhald sambært § 1 ikki verður hildið at vera nøktandi til at verja tann órættaða.

**§ 5.** Tilhald verður givið í ásetta tíð innan fyri eitt tíðarbil á upp til 5 ár. Uppihaldsforboð verður givið í ásetta tíð innan fyri eitt tíðarbil á upp til 1 ár.

**§ 6.** Tilhald ella uppihaldsforboð kann verða víðkað til eisini at fata um húsfólk hjá tí órættaða, um tað verður mett at vera neyðugt fyri røkka endamálinum við tilhaldinum ella uppihaldsforboðnum.

## Kapittul 2

*Burturvísing*

**§ 7.** Við burturvísing kann ein persónur eldri enn 18 ár fáa forboð fyri at uppihalda sær í heimi sínum.

**§ 8.** Ein persónur kann verða burturvístur, tá ið

1) grundaður illgruni er um, at hann ímóti einum av húsfólkum sínum hevur framt brot á §§ 210, 213 ella 266 í revsilógini, ella hann hevur framt brot á eina áseting í kapitli 24-26 í revsilógini, og sum sambært lógini kann geva fongsul í 1 ár og 6 mánaðir, ella hann hevur havt eina atferð, sum aðramáta ber í sær eina hóttan um harðskap ímóti einum av húsfólkunum, og

2) tá ið tað eftir upplýsingunum í málinum eru ávísar orsøkir at halda, at hann við at uppihalda sær í heiminum fer at fremja eitt lógarbrot, sum er nevnt í nr. 1.

**§ 9.** Í viðgerðini av einum burturvísingarmáli kann løgreglan halda aftur einum persóni, sum við rímiligari grund verður hildin at hava havt eina atferð, sum ber í sær eina hóttan um harðskap ímóti einum av húsfólkum hansara.

*Stk. 2.* Fyri afturhaldingina galda reglurnar fyri handtøku sambært §§ 755-759 og § 760, stk. 1, í rættargangslógini. Persónur kann ikki verða hildin aftur í meira enn 24 tímar.

**§ 10.** Burturvísing kann vara í ásetta tíð innan fyri eitt tíðarbil á upp til 4 vikur.

**§ 11.** Í seinasta lagi samstundis sum avgerð verður tikin um burturvísing, skal løgreglan geva kommununi fráboðan um málið.

*Stk. 2.* Saman við fráboðanini skal kommunan hava upplýsingar og skjøl í málinum, undir hesum elektroniskt goymdar dátur, sum hava týdning fyri viðgerðina hjá sosialu myndugleikunum av málinum.

## Kapittul 3

*Felags ásetingar*

**§ 12.** Tilhald, uppihaldsforboð og burturvísing mugu ikki vera í ósamsvari við tað ólag, sum inntrivini skapa hjá tí, sum skal ganga undir tey, við fyrilitið fyri tí ella teimum, sum tey skulu verja, ella við slagi av atferðini, sum víst er.

**§ 13.** Tilhald, uppihaldsforboð og burturvísing fevna ikki um samband, uppihald ella ferðing, sum av serligum orsøkum mugu metast at vera heimilað.

**§ 14.** Avgerð kann verða tikin um tilhald, uppihaldsforboð og burturvísing, tá ið ein persónur, sum inntrivið skal verja, biður um tað, ella tá ið almenn atlit krevja tað.

**§ 15.** Í málum um tilhald, uppihaldsforboð og burturvísing vegleiðir løgreglan partarnar um reglurnar í hesi lóg, tá ið høvi býðst til tess.

*Stk. 2.* Avgerðir um tilhald, uppihaldsforboð og burturvísing verða tiknar av fútanum.
*Stk. 3.* Ríkisadvokaturin viðger kærur um tilhald, uppihaldsforboð og burturvísing. Avgerðir hjá ríkisadvokatinum eru endaligar og kunnu ikki kærast víðari innan fyrisitingina.

**§ 16.** Avgerðir um tilhald, uppihaldsforboð og burturvísing skulu kunngerast. Við kunngerð av uppihaldsforboði og burturvísing skal viðkomandi hava vegleiðing um møguleikan at krevja avgerðina lagda fyri rættin.

## Kapittul 4

*Rættarroynd*

**§ 17.** Tann, sum fær uppihaldsforboð ella verður vístur burtur, kann innan 14 dagar eftir, at avgerðin er kunngjørd honum, krevja, at løgreglan leggur avgerðina fyri rættin.
*Stk. 2.* Tann, sum krevur avgerð um uppihaldsforboð ella burturvísing lagda fyri rættin (kærarin), skal fyri løgregluni upplýsa eina adressu og eitt møguligt telefonnummar, har innkallingin til ein møguligan rættarfund kann verða send. Ikki er neyðugt at kunngera innkalling til rættarfund.
*Stk. 3.* Málið skal leggjast fyri rættin skjótast tilber og í seinasta lagi innan 1 viku eftir, at kravið um hetta er móttikið. Er talan um burturvísing, skal málið tó leggjast fyri rættin innan 24 tímar.
*Stk. 4.* Krav um at leggja mál fyri rættin hevur ikki steðgandi virknað.

**§ 18.** Ein advokatur verður tilnevndur hjá tí, sum krevur avgerð um burturvísing fyri rættin. Ein advokatur kann verða tilnevndur hjá tí, sum krevur avgerð um uppihaldsforboð fyri rættin, um rætturin heldur tað vera ynskiligt, tá ið hugsað verður um viðurskiftini í málinum, avleiðingina av inntrivinum, støðuna hjá kæraranum og umstøðurnar annars. Tilnevndi advokaturin hevur somu rættindi sum ein verji í einum rættarmáli. Fyri ómaksløn og samsýning fyri útreiðslur til ein tilnevndan advokat galda somu reglur sum fyri ein tilnevndan verja, sbr. § 741 í rættargangslógini.
*Stk. 2.* Ein advokatur kann verða tilnevndur hjá einum órættaðum, sum skal geva frágreiðing í rættinum. Tá eru reglurnar í §§ 741 c og 741 d í rættargangslógini galdandi. Fyri ómaksløn og samsýning fyri útreiðslur til ein tilnevndan advokat galda somu reglur, sum tá ið talan er um frían rættargang, sbr. kapittul 31 í rættargangslógini.

**§ 19.** Rætturin ger av, um málið skal viðgerast skrivliga ella munnliga.
*Stk. 2.* Verður málið viðgjørt munnliga, skal rættarfundur haldast sum skjótast. Um áheitanin um at leggja málið fyri rættin verður sett fram, tá ið ein fyrstaførisavgerð um burturvísing verður kunngjørd, skal rættarfundur haldast innan 5 dagar.
*Stk. 3.* Kærarin hevur rætt at vera hjástaddur á einum møguligum rættarfundi og at siga sína hugsan, um ikki rætturin heldur, at hetta av serligum orsøkum er nyttuleyst ella til bága hjá viðkomandi. Málið kann viðgerast, hóast kærarin ikki møtir upp. Er ein advokatur tilnevndur sambært § 18, stk. 1, kann málið tó bert viðgerast, um tilnevndi advokaturin er møttur.
*Stk. 4.* Rætturin tekur avgerð út frá skjølunum í málinum og út frá eini møguligari frágreiðing hjá kæraranum í rættinum. Í serligum førum kann rætturin loyva aðrari próvførslu.
*Stk. 5.* Rætturin tekur avgerð við úrskurði. Góðkennir rætturin inntrivið, skal hann í úrskurðinum lýsa tær ítøkiligu umstøður, sum gera, at treytirnar fyri inntrivinum eru loknar.
*Stk. 6.* Verður tað álagt kæraranum at rinda sakarmálskostnað í einum revsimáli um viðurskifti, sum hava elvt til uppihaldsforboðið ella burturvísingina, verður tað í dóminum í revsimálinum eisini álagt honum at rinda sakarmálskostnaðin í málinum um

uppihaldsforboð ella burturvísing. Rætturin kann tó í undantaksførum gera av, at statskassin skal bera henda kostnað, um serligar orsøkir tala fyri tí.

**§ 20.** Í aðrar mátar galda reglurnar í rættargangslógini um revsirættargang.
*Stk. 2.* Viðvíkjandi endurgjaldskravi er § 1018 h í rættargangslógini galdandi. Viðvíkjandi afturhalding sambært § 9 er § 1018 a í rættargangslógini tó galdandi, tá ið burturvísing ikki verður framd ella góðkend.

## Kapittul 5

*Revsiásetingar*

**§ 21.** Tann, sum tilætlað brýtur eitt tilhald sambært § 1, eitt uppihaldsforboð sambært § 3 ella eina burturvísing sambært § 7, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 2 ár.
*Stk. 2.* Tá ið dømt verður eftir stk. 1, skal tað roknast sum herðandi, um tilburðurin er liður í eini skipaðari og áhaldandi forfylging ella ágangi.
*Stk. 3.* Brot á stk. 1 verður lógarsøkt eftir áheitan frá tí órættaða, ella tá ið almenn atlit krevja tað.

## Kapittul 6

*Broyting í aðrari lóggávu*

**§ 22.** Í lov nr. 277 af 26. maj 1976 om erstatning fra staten til ofre for forbrydelser, sum sett í gildi í Føroyum við anordning nr. 470 af 25. september 1985 og broytt við lov nr. 233 af 6. juni 1985, verður § 1, stk. 1 orðað soleiðis:

"Landið veitir endurgjald og rindar útreiðslur í sambandi við persónskaða, sum verður framdur við broti á løgtingslóg um revsing (Revsilógin) ella løgtingslóg um tilhald, uppihaldsforboð og burturvísing (Tilhaldslógin), um lógarbrotið er framt í Føroyum. Tað sama er galdandi fyri persónskaða, sum hendir í samband við at persónur hjálpir løgregluni við eini handtøku ella í samband við gerðir, sum verða framdar við atliti at lógligari eginhandtøku ella at forða fyri revsiverdum gerðum."

## Kapittul 7

*Gildiskoma*

**§ 23.** Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2017

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

**Orsøkir til uppskotið**
Tann 8. mars 2011 góvu Vinnumálaráðið, Almannamálaráðið, Innlendismálaráðið og Heilsumálaráðið út álitið: Harðskapur í parlagi og nærsambondum.

Í formælinum verður sagt, at harðskapur í parlagi og nærsambondum fer fram í Føroyum eins og aðrastaðni. Harðskapurin er ikki avmarkaður til nakrar samfelagsbólkar, men kann koma fyri sama hvønn aldur, útbúgving, ættarslag, tjóð, átrúnað, seksualitet ella evni fólk hava. Harðskapurin er ofta ósjónligur, men hevur ógvusligar avleiðingar fyri tey, sum eru fyri harðskapinum.

Álitið frá 2011 er fyrsta heildarætlanin, sum hevur til endamáls at fyribyrgja og steðga harðskapi. Heildarætlanin fatar víða og fevnir um 18 átøk, sum eru ætlað at fyribyrgja og upplýsa um harðskap umframt at stuðla og viðgera fólk, ið eru fyri harðskapi.

Eitt av tilmæltu átøkunum, átak nr. 9, er *at veita heimild at vísa honum, ið fremur harðskap, burtur frá heiminum (og øðrum nevndum støðum) eitt ávíst skifti.* Endamálið við hesum er at skapa frið eina tíð hjá tí harðskapsrakta til at taka støðu til framtíðina. Tílík heimild kann forða fyri, at børn verða flutt úr egnum umhvørvi í annað stað.

Við hesum lógaruppskotinum verður m.a. heimilað at burturvísa einum harðligum persóni úr heiminum, umframt at áseta greiðar reglur um tilhald og uppihaldsforboð.

**Galdandi lóggáva**
Eftir galdandi lóggávu kann løgreglan gera ymisk átøk mótvegis persónum, sum antin hava framt ella kunnu væntast at fremja harðskap í familjuni. Alt eftir umstøðunum kann persónur, sum er undir illgruna um revsiverd viðurskifti, verða handtikin ella varðhaldsfongslaður, eins og ein persónur kann verða settur í bráðhald, um hann verður hildin at vera til vanda fyri seg sjálvan ella onnur. Harafturat kann ein persónur, sum veldur øðrum ónáðir, t.d. einum fyrrverandi sambúgva, við forfylgjandi ella harðligum atburði, fáa tilhald (ávaring).

Felags fyri øll hesi átøkini er, at tey í størri ella minni mun avmarka rásarúmið hjá brotsmanninum ella møguliga brotsmanninum. Umframt reglurnar í rættargangslógini eru eisini ásetingar í aðrari lóggávu, sum loyva inntrivi við tvingli (uttanfyri revsirættargangin), soleiðis at rásarúmið hjá viðkomandi verður avmarkað, t.d. tvingsilsinnlegging á sálarsjúkrahús ella at taka barn við tvingsli heimanífrá.

*1. Tilhald eftir revsilógin § 265.*
Ávaring (tilhald) verður givin við heimild í § 265 í revsilógini. Eftir hesi ásetingini kann ein persónur, sum veldur einum øðrum ónáðir, revsast við sekt ella fongsul upp til 2 ár, um so er at viðkomandi frammanundan frá løgregluni hevur fingið ávaring um ikki at troka seg inn á, skrivliga at forfylgja ella á annan líknandi hátt at gera seg inn á hendan persónin.

Tað serliga við tilhaldi er, at gerðir, sum ikki í sær sjálvum eru revsiverdar, gerast revsiverdar, eftir at ein ávaring sum tilhald er givin. Tilhald kann sostatt virka upp á tveir mátar. Í fyrsta lagi kann samband, sum í sær sjálvum er til ampa, forbjóðast. Í øðrum lagi kann man við at seta forboð fyri sambandi millum órættaða og tann ágangandi partin, t.d.

tann harðliga partin, fyribyrgja, at tað kunnu íkoma støður, har nýggir tilburðir av t.d. harðskapi henda.

Tað er ein fyritreyt fyri revsiábyrgd eftir § 265, at tað áðrenn ágangin er givið viðkomandi tilhald (ávaring). Treytirnar fyri at geva tilhald eru ikki ásettar í revsilógini, men eru ásettar í *Justitsministeriets cirkulæreskrivelse nr. 11075 af 12. februar 1990 om behandling af sager om meddelelse af advarsler i henhold til straffelovens § 265.* Tað sæst í rundskrivinum, at avgerð um tilhald skal takast grundað á eina ítøkiliga meting av øllum roynveruligu og rættarligu viðurskiftunum í málinum. Tað sæst eisini, at ítøkiligu málini kunnu vera ógvuliga ymisk, og at tað tí einans ber til at áseta nakrar fáar leiðreglur um metingina. Tað verður í rundskrivinum lagdur dentur á, at løgreglan í ivamálum ikki eigur at vera ov varin við at geva tilhald.

Tað sæst eisini í rundskrivinum, at fyritreytin fyri at taka avgerð um tilhald er, at tann kærdi longu eina ella fleiri ferð hevur framt slíkan ágang, sum er fevndur av ávaringini. Tað ber ikki til at geva ávaring í teimum førum, har onki er hent millum partarnar, men har annar parturin heldur, at hin parturin møguliga onkuntíð seinni fer at gera okkurt, sum kann geva grund fyri at geva ávaring. Hinvegin er tað ikki neyðugt, at hendingarnar eru meldaðar til ella eftirkannaðar av løgregluni. Hevur løgreglan kortini fyrr verið uppi í málinum orsakað av hendingunum, vil tað ofta vera serligur tørvur fyri at geva eina ávaring. Hetta er serstakliga galdandi í teimum førum, har tað fyrr er noktað at ganga eini umbøn um ávaring á møti, og har tað samstundis er upplýst pørtunum, at málið kann takast upp aftur, um nýggjur ágangur fer fram.

Viðvíkjandi tí at valda øðrum ónáðir verður sagt í rundskrivinum, at hetta eftir umstøðunum eisini kann vera brot á aðrar ásetingar í revsilógini. Ónáðir eru tó ofta áheitanir av slíkum slagi, sum ikki í sjálvum sær eru revsiverdar ella hóttandi, illboðandi, mannminkandi, kropsliga ágangandi ella líknandi. Í slíkum førum har tað einamest er talið av áheitanum, sum ger, at tær kennast ótýdligar og órógvandi, skal tað vanliga vera fleiri førir av ónáðum, og sum eru farin fram í eina ávísa tíð, áðrenn tilhald verður givið.

Sambært rundskrivinum vil ein einstøk uppøst hending vanliga ikki vera nøktandi grund til at geva eina ávaring uttan so, at talan er um munandi grovleika. Løgreglan eigur sostatt ikki at vera ov afturhaldandi við at geva ávaring í førum, har órættaða hevur verið neyðtikin, har talan er um harðskap av ávísum grovleika ella hóttanir eftir § 266 í revsilógini. Um órættaði er bangin fyri, at brotsmaðurin fer at venda aftur, eigur tað ikki at vera sett ov strong krøv til metingina fyri, hvussu sannlíkt hetta er.

Tað sæst eisini í rundskrivinum, at fyritreytin fyri at boða frá ávaring er, at partarnir ikki longu eru komnir saman aftur ella kunnu roknast við at koma saman aftur, og at tað tí framhaldandi verður mett, at ágangur kann koma fyri, sum kann vera grundarlag fyri, at man frá almennari síða beinleiðis forðar fyri sambandi millum tey. Um hendan treytin er lokin, verður avgjørt grundað á eina meting av øllum roynveruligu og rættarligu viðurskiftunum, sum eru í tí ítøkiliga málinum. Tað kann tí vera givin ávaring í einum føri, har tað t.d. í einum hjúnarbandi ikki er send inn umbøn um sundurlesing ella skilnað, at samlívið um brotsgerðarmundið ikki var slitið, ella at kærdi hevur samverurætt við børn, sum búgva hjá órættaða. Eisini í hesum førum kann grovleikin av ágangstartinum vera av týdningi. Tað er harafturímóti sjálvandi ein avgerandi fyritreyt, at samlívið millum partarnar er slitið um tað mundið, tá ávaring verður fráboðað.

*2. Fyrisitingarlig avgerð, kæra, tíðarfreist, teleupplýsing*
At boða frá tilhaldi er ein fyrisitingarlig avgerð, og krøvini í fyrisitingarlógini um partshoyring, grundgeving og kæruvegleiðing o.a. eru galdandi. Ásetingar eru í rundskrivinum um, hvussu mál um tilhald skulu viðgerast fyrisitingarliga.

Sambært § 265, 2. pkt. í revsilógini er tilhald galdandi í 5 ár. Tilhaldið kann tó beinanvegin avmarkast til eina styttri tíð. Ásettað freistin upp til 5 ár kann leingjast áðrenn, ella tá 5-ára freistin er úti, um tað framhaldandi er grundarlag fyri einum tilhaldi.

Avgerðin hjá Fútanum kann kærast til ríkisadvokatin, hvørs avgerð er endalig og kann ikki kærast víðari innan fyrisitingin. Sí rættargangslógina § 100, stk. 3.

Løggildið av avgerðini hjá løgregluni um tilhald kann eisini roynast í rættinum saman við einum revsimáli um brot á tilhaldið. Harumframt kann løggildið av einum tilhaldi roynast av rættinum efter vanligu regluni í § 63 í Grundlógini. (UfR.2003.153 H.)

Brot á § 265 er undir egnari lógsókn, tó so at almenn lógsókn kann vera, tá órættaða biður um tað, sí revsilógina § 275. Málini eru politimál sambært § 721 í rættargangslógini.

Sambært § 779 b, stk. 3, 1. pkt. í rættargangslógini kann *teleupplýsing* brúkast, sjálvt um brotsverkskravið í 779 b, stk. 1, nr. 3 ikki er lokið, um illgruni er um afturvendandi ónáðir sambært § 265 í revsilógini. Treytirnar í § 779 b, stk. 1, nr. 1 (illgrunakravið) og nr. 2 (ábendingarkravið) skulu tó vera loknar.

Í § 779 a, stk. 1, nr. 3 í rættargangslógini sæst, at teleupplýsing er tann støðan, at løgreglan kann fáa upplýsingar um, hvørjar telefonir ella onnur samsvarandi samskiftistól, ið kunnu setast í samband við eina ávísa telefon ella samsvarandi samskiftistól, hóast eigarin ikki hevur givið loyvi til tess.

*3. Tøl frá løgregluni um tilhald í Føroyum.*
Løgreglan í Føroyum hevur upplýst, at seinastu 5 árini hevur løgreglan fingið 49 *umbønir* um at geva tilhald og sama tíðarskeið eru skrásett 33 *brot* á givin tilhald.

Býti í árunum 2011-2015 var fylgjandi:

| *Umbøn um tilhald:* | | *Brot á givin tilhald* | |
|---|---|---|---|
| 2011: | 10 umbønir | 2011: | 12 brot |
| 2012: | 8 umbønir | 2012: | 10 brot |
| 2013: | 8 umbønir | 2013: | 7 brot |
| 2014: | 7 umbønir | 2014: | 1 brot |
| 2015: | 16 umbønir | 2015: | 3 brot |
| Íalt: | 49 umbønir | Íalt: | 33 brot |

Sambært føroysku løgregluni er tilhald vanligast í málum, har trupulleikar eru millum hjúnarfelagar ella sambúgvar vegna hjúnarskilnað, og har partarnir ikki finnur stevið aftaná.

Eitt tilhald sambært § 265 hevur gildið í 5 ár ella til tað t.d. fellur burtur, tí tann parturin, sum hevur biðið um tilhaldið, tekur uppaftur sambandi við partin, sum hevur fingið tilhald.

Um brot ikki verður framt á tilhaldið, hoyrir løgreglan ikki meira til málið.

Um partarnir hava børn, skal tað bera til at samstarva um børnini, uttan at tað við hesum verður framt brot á tilhaldið.

Í serligum førum kunnu umstøðurnar gera tað ógjørligt at geva einum parti tilhald. Dømi um hetta er eitt mál, har parturin, sum bað um tilhaldið, búði inni hjá fyrrverandi verforeldrunum. Í einum slíkum føri ber tað ikki til at nokta hinum partinum at koma inn til síni egnu foreldur og familju. Tílíkir trupulleikar kunnu møguliga eisini koma fyri í Danmark, men slíkt er nokk meira vanligt í einum lítlum samfelagi sum tað føroyska .

Í málum um tilhald brúkar føroyska løgreglan leiðreglurnar í *Justitsministeriets cirkulæreskrivelse nr. 11075 af 12. februar 1990 om behandling af sager om meddelelse af advarsler i henhold til straffelovens § 265.* Hetta merkir, at tað skal ikki so nógv til at geva eitt tilhald.

At geva tilhald er ein fyrisitingarlig avgerð og ikki eitt revsirættarligt inntriv. Parturin, sum biður um tilhald, skal bert gera tað sannlíkt, at tørvur er á einum tilhaldi. Hinvegin skal hin parturin hoyrast, áðrenn avgerð verður tikin í málinum.

Sum tølini eisini vísa, eru tað ikki nógv mál um tilhald í Føroyum. Løgreglan heldur, at hetta møguliga kann koma av, at fólk ikki er nóg væl kunnaði um hendan møguleikan.

Í føroysku málunum um tilhald er tað ofta tær somu familjurnar, sum ganga aftur, og sum kanska eisini hava aðrar trupulleikar t.d. við harðskapi.

Løgreglan í Føroyum hevur ikki kunnleika um, at her eru mál um tráfylging. (stalking)

**Endamálið við uppskotinum**

Við hesum lógaruppskotinum verður skotið upp at styrkja og gera greiðir reglur fyri tey átøk, sum skulu verja persónar fyri at vera fyri ágangi, forfylging og ónáðir, undir hesum eisini tráfylging (stalking).

Frá at tað einans hevur verið møguligt at geva tilhald, verður tað við hesum lógaruppskotinum eisini møguligt at geva uppihaldsforboð og í ávísum førum at vísa persóni burtur úr heimi sínum upp til 4 vikur.

Treytirnar fyri nær tað kann verða givið tilhald og uppihaldsforboð, og nær persónur kann vísast burtur úr heimi sínum, vera við hesum lógaruppskotinum eisini ásettar beinleiðis í lógini í staðin fyri sum nú í rundskrivi nr. 11075 frá 12. februar 1990 frá Justitsministerinum.

**Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**

Nýggja lógin um tilhald, uppihaldsforboð og burturvísing hevur greiðari reglur um tilhald. Tað fer nú eisini at bera til at geva landafrøðiliga treytað uppihaldsforboð, umframt at tað verður heimilað at vísa ein harðligan persóni burtur úr heimi sínum. Hetta er í tráð við tilmælið í heildarætlanini: Harðskapur í parlagi og nærsambondum.

Lógin inniber í høvuðsheitum at:

1) Reglurnar um tilhald verða greiðari. Treytirnar verða nú beinleiðis ásettar í lógini.

2) Tilhald fer framyvir at verja fyri øllum slagi av sambandi og ikki sum nú, bert samband, sum verður mett at vera til ónáðir (brot á persónliga friðin). Hetta hevur við sær, at tað verður lættari at staðfesta brot á tilhald.

3) Tað fer at bera til at geva uppihaldsforboð, t.v.s. at forbjóða uppihaldi innanfyri eitt landafrøðiliga greitt avmarkað øki, t.d. nærhendis heimi ella arbeiðsplássi hjá órættaða.

4) Persónur eldri enn 18 ár kann í eitt styttri tíðarskeið vísast burtur úr heimi sínum. Treytin er, at viðkomandi er undir illgruna fyri brot á revsilógina §§ 210, 213 ella 266 ella brot, sum er fevnt av kap. 24-26 í revsilógini, og sum kann hava við sær fongsul í 1 ár og 6 mðr. Ein persónur kann eisini vísast burtur, um hann ber seg at á ein slíkan hátt, sum kann vera hóttandi móti húsfólkinum.

5) Tilhald og uppihaldsforboð fer eisini at kunna fata um húsfólk hjá órættaða um hetta verður hildið neyðugt fyri at røkka endamálinum við tilhaldinum og/ella uppihaldsforboðnum.

6) Tráfylging (stalking) verður allýst sum skipað og áhaldandi forfylging og ágangur, og hetta verður mett sum ein herðandi umstøða, tá revsing skal ásetast fyri brot á tilhald, uppihaldsforboð og burturvísing.

7) Ein nýggj serliga áseting er, at um ein persónur hevur verið fyri grovum og vandamiklum brotsverki, skal tað beinanvegin kunna gevast brotsmanninum tilhald, soleiðis at órættaði og næstringarnir ikki skulu tola samband o.a. við brotsmannin.

*1. Tilhald §§ 1-2 og §§ 5-6.*
Tilhald verður eftir galdandi lóg givið við heimild í § 265 í revsilógini. Eftir hesi ásetingini kann ein persónur, sum veldur øðrum persóni ónáðir, revsast við sekt ella fongsul upp til 2 ár, um so er at viðkomandi frammanundan frá løgregluni hevur fingið ávaring um ikki at troka seg inn á, skrivliga at forfylgja ella á annan líknandi hátt at gera seg inn á hendan persónin.

Tað serliga við tilhaldi er, at gerðir, sum ikki í sær sjálvum eru revsiverdar, gerast revsiverdar, eftir at ein ávaring sum tilhald er givin. Tilhald kann sostatt virka upp á tveir mátar. Í fyrsta lagi kann samband, sum í sjálvum sær er til ónáðir, forbjóðast. Í øðrum lagi kann man við at seta forboð fyri sambandi millum órættaða og tann ágangandi partin, t.d. tann harðliga partin, fyribyrgja, at tað kunnu íkoma støður, har nýggir tilburðir av t.d. harðskapi henda.

Í lógaruppskotinum verður tað skotið upp at broyta tilhald frá at vera eitt forboð móti at valda øðrum persóni ónáðir til at vera eitt forboð móti í útgangsstøðinum einum og hvørjum sambandi. Hendan nýggja uttanveltaða lýsingin av tilhaldi er ein einfaldsgering, sum hevur bæði hugsjónarligan og roynveruligan týdning, tí tað merkir, at tá brot verður staðfest á eitt tilhald, er tað ikki longur neyðugt at sanna, at sambandi veldur øðrum persóni ónáðir. Hinvegin merkir tað eisini, at um eitt tilætlað samband skal vera órevsivert, so er tað neyðugt, at tað verður mett, at sambandið av serligum orsøkum hevur verið heimilað. Sí eisini § 13.

Sambært § 1 er tilhald eitt revsiálagt forboð um at leita upp ein annan persón antin persónliga, munnliga ella skriftliga, undir hesum eisini við elektroniskum samskifti, ella á annan hátt at seta seg í samband við ella elta ein annan.

Í *§ 2, stk. 1, nr. 1* verður lýst, hvat tað er fyri viðurskifti, sum kunnu hava við sær, at tilhald verður givið. Ásett er at tilhald kann verða givið grundað á, at ein persónur antin a) hevur volt øðrum persóni ónáðir við at forfylgja ella órógva hann, soleiðis sum nevnt er í § 1, ella b) hann ímóti hesum persóni hevur gjørt annað revsivert, sum kann javnmetast við ónáðir.

Eftir *§ 2, stk. 1, nr. 2* krevur tilhald eisini, at tað eru ávísar orsøkir eru at halda, at hann framhaldandi fer at volda hinum ónáðir, soleiðis sum nevnt er í nr. 1.

Í *§ 2, stk. 2* er eina serliga regla um tilhald. Eftir hesi reglu kann tilhald verða givið í førum, har tað er framt groft persónsvandamikið lógarbrot.

Tað er í fyrsta lagi ein treyt, at tað er grundaður illgruni um, at viðkomandi hevur brotið eina av ásetingarnar í revsilógininum um dráp, rán, frælsisskerjing, harðskap, eldáseting, neyðtøku ella annað kynsligt brotsverk ella roynt at gera eitt av nevndu brotsverkunum, sbr. *§ 2, stk. 2, nr. 1*.

Í øðrum lagi er tað ein treyt, at órættaði ella hansara nærmastu orsakað av grovleikanum av lógarbrotinum ikki eiga at skulu finna seg í at hava samband o.a. við viðkomandi, sum ásett í § 1, sbr. § 2, stk. 2, nr. 2.

Eftir greinini kann tilhald verða givið í teimum førum, har kærdi hevur framt eitt so groft brotsverk móti einum persóni, at órættaði ikki skal tola áheitanir frá kærda, óansæð um tað annars eru ítøkiligar orsøkir at halda, at viðkomandi aftur fer at gera seg inn á órættaða ella hansara nærmastu.

Fleiri upplýsingar um tilhald eru undir serligu viðmerkingunum til §§ 1 – 2, §§ 12-16 og § 21.

*2. Uppihaldsforboð §§ 3-6.*
Í lógaruppskotinum verður skotið upp at seta inn eina nýggja reglu um *uppihaldsforboð (landafrøðiliga ásett tilhald).*

Eitt uppihaldsforboð merkir, at kærdi fær forboð fyri at uppihalda seg ella ferðast á einum nærri tilskilaðum øki nærindis bústaði, arbeiðsstaði, útbúgvingarstaði ella tilhaldsstaði hjá øðrum persóni ella nærindis øðrum staði, har tann órættaði ofta ferðast.

Endamálið er at seta í verk ein trygdargeira fyri tann, sum uppihaldsforboðið skal verja, soleiðis at man kann avmarka ótryggleikan hjá persónum, sum hava verið og framvegis eru undir stórum trýsti orsakað av grovum ella tíðum endurtakandi føri av ónáðum, ella orsakað av at eitt tilhald ikki verður virt. Samstundis er uppihaldsforboð eitt týdningarmikið stig á leiðini til veruliga at fyribyrgja meira ágang á tann, sum uppihaldsforboðið skal verja.

Upphaldforboð kann einans verða givið, um treytirnar fyri at geva tilhald eru loknar, sbrt. § 2. Tað er ikki nøkur treyt, at kærdi hevur fingið tilhald. Uppihaldsforboð kann verða givið samstundis sum tilhald ella uttan tilhald. Endamálið við uppihaldsforboði vil vanliga hava við sær, at tilhald verður givið samstundis sum uppihaldsforboðið, um viðkomandi ikki frammanundan hevur fingið tilhald.

Tað er skotið upp, at tilætlað brot á uppihaldsforboð eftir § 3 á sama hátt sum tilhald verður revsað við sekt ella fongsil upp í 2 ár, sbr. § 21.

Fleiri upplýsingar um uppihaldsforboð eru undir serligu viðmerkingunum til §§ 3-6, §§ 12-21

*2.2. Grundlógin § 71 og uppihaldsforboð*
§ 71, stk. 1, 1. pkt. í Grundlógini ásetir, at: "den personlige frihed er ukrænkelig". Eitt uppskot sum heimilar at avgerð kann takast um uppihaldsforboð, sum er eitt landafrøðiliga avmarkað tilhald, má metast í mun til hesa ásetingina.

Tað er í løgfrøðiliga lesnaðinum stórt sæð semja um, at hesin parturin av ásetingini í § 71 ikki kann metast at hava nakran sjálvstøðugan rættarligan týdning, men meira má roknast at vera ein yvirlýsing uttan rættarligt innihald.

Alf Ross, professari, metir tó, at ásetingin, hóast hon mest hevur týdning sum ein grundregluframsøgn, tó hevur ávísan sjálvstøðugan týdning, við tað at hon helst forðar fyri tilvildarligum, óbundnum inntrivum í eginfrælsi.

Í § 71 eru eisini reglur um frælsistøku innan og uttanfyri revsirættargangin.

Sambært stk. 2 kann frælsistøka einans verða framd við heimild í lóg. Í hægstarættardómi U.1926.277 H varð staðfest, at talan skal vera um beinleiðis og nágreiniliga heimild.

Viðvíkjandi spurninginum nær talan er um frælsistøku sambært § 71, er tað í løgfrøðiliga lesnaðinum semja um, at ikki eitthvørt inntriv í ferðafrælsi hjá einum persóni kann roknast sum frælsistøka sambært § 71 í grundlógini. Tað tykist at vera semja um, at forboð fyri at koma á eitt ávíst stað, ikki kann roknast sum frælsistøka. Hetta er eisini galdandi hóast viðkomandi hevur fingið forboð fyri at koma í ein størri part av landinum.

Á hesum grundarlagi verður mett, at ein avgerð sambært skipanini í uppskotinum um at geva einum persóni uppihaldsforboð ikki er í stríð við § 71 í Grundlógini.

*3. Burturvísing §§ 7-11.*
Ásetingin í *§ 7* er nýggj og staðfestir, at burturvísing merkir eitt forboð fyri at upphalda seg í heimi sínum.

Uppihald merkir ein og hvør likamlig hjávera á viðkomandi staði. Ein burturvísing merkir sostatt, at øll hjávera í bústaðnum er eitt brot, uttan mun til um tað er eitt stutt uppihald. Ein burturvísing rúmar sostatt bæði eitt uppihaldsforboð og eitt atgongubann.

Eftir *§ 8, nr. 1* er tað ein treyt, at tað er grundaður illgruni um, at hann ímóti einum av húsfólkum sínum hevur framt brot á eitt av teimum nevndu brotsverkunum í revsilógini, sum sambært lógini kunnu hava við sær fongsul í 1 ár og 6 mánaðir (1. liður), ella hann hevur havt eina atferð, sum í aðramáta ber í sær eina hóttan um harðskap ímóti einum av húsfólkunum (2. liður).

Kjarnuøkið, har burturvísing verður brúkt, er sostatt harðligur og hóttandi atburður. Burturvísing kann tó eisini verða brúkt við t.d. kynsligum brotsverkum og ávísum brotsverkum í familjuviðurskiftum, undir hesum t.d. blóðskemd.

Tað er eisini ein treyt, at revsiverda lógarbrotið er framt móti ein persóni í húskinum.

Sambært *§ 8, nr. 2* krevur burturvísing eftir nr. 1, at tað eru ávísar orsøkir at halda, at hann við at uppihalda sær í heiminum fer at fremja eitt lógarbrot, sum er nevnt í nr. 1.

*§ 9, stk. 1* í uppskotinum heimilar løgregluni at halda aftur ein persón fyri at avhoyra viðkomandi o.a. og við tí í hyggju at forða ágangi, tá tað er rímilig grund at halda, at persónurin hevur havt eina atferð, sum ber í sær eina hóttan um harðskap ímóti einum av húsfólkum hansara.

Burturvísing kann væntast at vera brúkt, tá tað longu er framdur ágangur ella hóttanir eftir § 266 í revsilógini. Rokna verður við, at hendan serreglan tí einans fer at verða brúkt í fáum førum.

Í *§ 10* er ásett, at burturvísing ikki kann vara longur enn 4 vikur. Um treytirnar framhaldandi eru til staðar, kann avgerð um burturvísing framleingjast upp til 4 vikur í senn. Tað er ikki ásett nakað endaligt longstamark fyri eini burturvísing.

Í *§ 11* er ásett, at sosialu myndugleikarnir skulu hava fráboðan um málið í seinasta lagi samstundis sum avgerð um burturvísing verður tikin.

Við hesi ásetingini hevur Fútin eina rættarliga skyldu til at boða sosialu myndugleikunum frá burturvísingini. Fráboðanarskyldan hjá Fútanum skal síggjast í ljósinum av, at avgerðir um burturvísing vanliga hava uppruna í álvarsligum sosialum trupulleikum, samlívstrupulleikum, misnýtslutrupulleikum o.a. Í samband við burturvísing vil tað ofta vera tørvur á at veita sosialan stuðul til annan ella báðar partar, og tí eiga sosialu myndugleikarnir so tíðliga sum gjørliga at fáa fráboðan um vavið av trupulleikunum fyri at kunna seta í verk møguligar fyriskipanir.

Fleiri upplýsingar um burturvísing eru undir serligu viðmerkingunum til §§ 7-11 og §§ 12-21

*3.2. Grundlógin § 73 og burturvísing*
Sambært uppskotinum fer tað at bera til at taka avgerð um, at ein persónur, sum t.d. eigur ella leigar ein bústað, verður vístur burtur og tess vegna fær forboð fyri at brúka sín bústað. Tað verður við hesum givin heimild til at gera inntriv í rættindi, sum verða mett at vera vard eftir § 73 í grundlógini.

Tað má tess vegna umhugsað, um ein burturvísing kann vera ognartøka.

Í fyrsta lagi er dentur lagdur á, at ein avgerð um burturvísing er eitt munandi inntriv mótivegis tí persóni, sum má fara úr sínum heimi.

Í øðrum lagi er tað m.a. eisini lagdur dentur á, at burturvísing av einum persóni hevur til endamáls at forða fyri, at viðkomandi við at verða verandi í heiminum fer at fremja álvarsligt brotsverk. Tað kann í tí sambandi vísast til, at eftir skipanini í uppskotinum er tað ein treyt fyri at taka avgerð um at vísa burtur ein persón, at tað er grundaður illgruni um, at viðkomandi ímóti einum av húsfólkum sínum hevur framt brot á §§ 210, 213, 266 í revsilógini og ásetingarnar í kapittul 24-26, sum kann hava við sær fongsul upp í 1 ár og 6 mánaðar, ella at viðkomandi hevur haft eina atferð, sum í aðramáta ber í sær eina hóttan um harðskap móti einum persóni av húsfólkunum, at tað eru ávísar orsøkir at halda, at

viðkomandi við at uppihalda sær í heimi sínum fer at fremja eitt av nevndu lógarbrotum, og at burturvísing ikki er í ósamsvari við tað ólag, sum inntrivini skapa hjá tí, sum skal ganga undir tey, við fyrilitið fyri tí ella teimum, sum tey skulu verja, ella slag av atferðini, sum viðkomandi hevur sýnt.

Harumframt er dentur eisini lagdur á, at tað sambært skipanini í uppskotinum skal tað ásetast ein freist fyri burturvísingina, sum ikki kann fara upp um 4 vikur, og at freistin í mesta lagi kann framleingjast við 4 vikum í senn. Harumframt skal ein avgerð um burturvísing verða strikað, tá treytirnar fyri burturvísing ikki longur eru loknar.

Á hesum grundarlagi verður mett, at ein avgerð sambært skipanini í uppskotinum um at burturvísa ein persón ikki er eitt ekspropriativt inntriv í rættindi, sum er vard sambært § 73 í Grundlógini.

**Ummæli og ummælisskjal**

Uppskotið hevur verið sent til ummælis hjá Føroya Rætti, Føroya Landfúta, Kriminalforsorgini, Mentamálaráðnum, Almannamálaráðnum, Heilsumálaráðnum, Føroya Fróskaparsetri, Almannaverkinum, Føroya Advokatfelag, Felagnum Føroyskir sálarfrøðingar, Sosialráðgevarafelagnum, Sig Frá, Amnesty International, Kris, Anti-stalking felagnum í Føroyum, Barnabati, Kvinnuhúsinum, Barnaverndarstovu Føroya, Kommunufelag Føroya, Javna, Meginfelag teirra Brekaðu, Gigna, Føroya lærarafelag og Føroya pædagogfelag.

Greitt verður í stuttum frá, hvørjar viðmerkingar ummælispartarnir hava gjørt.

Greitt verður eisini frá, hvørja støðu landsstýrismaðurin og stjórnarráðið hevur til hesar viðmerkingar. Hetta ger, at møguligar avleiðingar av lógaruppskotinum verða umhugsaðar og lýstar betur.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

**Fíggjarligar avleiðingarnar fyri land og kommunur**

Uppskotið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar við sær fyri land og kommunu.

**Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**

Lógaruppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

**Avleiðingar fyri vinnuna**

Lógaruppskotið hevur ongar fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna.

**Avleiðingar fyri umhvørvið**

Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

**Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**

Lógaruppskotið hevur ikki fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir, undir hesum ríkismyndugleikar**

*Ríkismyndugleikar.*Væntandi fær nýggja lógin um tilhald, uppihaldsforboð og burturvísing nakað av umsitingarligum og fíggjarligum avleiðingum fyri løgregluna í Føroyum, við tað at hetta fer at krevja meira arbeiði av løgregluni, undir hesum eisini eina vegleiðingarskyldu.

Lógin kann eisini fáa umsitingarligar og fíggjarligar avleiðingar fyri dómsvaldið, tí mál um uppihaldsforboð og burturvísinig skulu eftir áheitan frá tí burturvísta kunna leggjast fyri rættin innan 14 dagar.

Talan er um ríkismyndugleikar, og tí hevur lógaruppskotið ikki beinleiðis fíggjarligar avleiðingar fyri landið ella kommunur.

*Javnstøðuligt sjónarhorn.* Tað vísir seg, at tað mest sum bara eru menn, sum fáa tilhald og vera burturvístir. Við hesum uppskotinum verður fokus tí sett á eitt øki, har tað serliga eru kvinnur sum eru órættaðar.

Lógaruppskotið hevur annars ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

**Millumtjóðasáttmálar á økinum**

Tað eru ikki millumtjóðasáttmálar á hesum økinum, ið lógaruppskotið fevnir um, sum Føroyar hava skyldu at fylgja.

Uppskotið hevur tí ikki fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella aðrar avleiðingar grundað á skyldur í millumtjóðasáttmála.

**Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**

*1. Evropeiski mannarættindasáttmálan, EMRS,* Anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneskerettighedskonvention. Sáttmálin varð settur í gildi fyri Føroyar við lóg tann 1. mai 2000.

Eftirsum *grein 8* í Mannarættindasáttmálanum verjir rættin hjá øllum til virðing fyri familjulívi og sínum heimi, kann ein *burturvísing* vera eitt inntriv í hesi vardu rættindini.

Sambært *grein 2, stk. 1 í 4. ískoytisprotokol* til sáttmálan hava øll, sum lógliga eru í einum landi, rætt til at ferðast frítt í landinum og hava frælsi at velja sítt tilhaldsstað.

Sambært sáttmálanum kunnu inntriv gerast, um inntrivið er lógarheimilað, røkir eitt viðurkenningarverdugt endamál, undir hesum at forða fyri órógv ella brotsverki ella at verja rættindi ella frælsi hjá øðrum, og er lutfalsligt (neyðugt í einum demokratiskum samfelagi).

Í metingini av um grein 8 í mannarættindasáttmálanum forðar fyri reglum um burturvísing, eru tey vandafyribyrgjandi- og verjuendamálini, sum eru orsøkin til at skjóta upp eina burturvísingarheimild, av stórum týdningi. Tá burturvísing fyrst og fremst skal verja ein ítøkiligan hóttan persón at koma undir lógarbrot, tvs. “fyribyrgja órógv ella brotsverki” og “ verja rættindi hjá øðrum”, verður tað mett at at vera talan um eitt viðurkenningarverdugt endamál, sum sambært grein 8, stk. 2 í sáttmálanum kann geva rætt til avmarking í nevndu

rættindum. Somuleiðis er tað avgerandi, at brúk av burturvísing er bundið til lutfalsmeginregluna.

Av tí at uppskotnu lógarreglurnar um burturvísing eru gjørdar í samsvari við hesar leiðreglur, verður mett at uppskotnað burturvísingarskipanin er sambærilig við grein 8 og við grein 2 í 4. ískoytisprotokol til sáttmálan.

*Grein 1 í 1. ískoytisprotokol* til sáttmálan er eitt ískoyti til grein 8. Sambært ásetingini hevur ein og hvør likamligur ella løgfrøðiligur persónur rætt til virðing fyri síni ogn. Ongin má frátakast sína ogn undantikið í samfelagsins áhugamálum og í samsvari við tær treytir, sum eru ásettar í lóg og samsvarandi vanligu meginreglunum í fólkarættinum. Í máliskuni "frátakast" liggur, at tað skal vera talan um varandi yvirførslu av ognarskapinum ella týning av viðkomandi ogn.

Longu tað at burturvísing er eitt fyribils og í aðrar mátar eitt avmarkað inntriv í ognarskapin hevur við sær, at grein 1 í 1. ískoytisprotokol til sáttmálan ikki verður mett at forða fyri reglum um burturvísing.

*2. Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek*, áleggur limalondunum at menna og fremja politikk, lógir og fyrisitingarlig mál, ið skulu tryggja rættindi hjá fólki, ið bera brek.

Sáttmálin varð settur í gildi fyri Føroyar tann 23. august 2009 við "Bekendtgørelse nr. 35 af 15. september 2006 om rettigheder for personer med handicap".

Ásetingarnar í lógaruppskotinum gera ikki mun á, um talan er um persónar, sum bera brek ella ikki. Tað hevur heldur ikki verið mett neyðugt við serligar ásetingum fyri at javnseta persónar, sum bera brek, við tey, sum ikki bera brek.

**Marknaforðingar**

Marknaforðingar eru lógir, almennar reglur og siðvenjur, ið tarna flytføri hjá tí einstaka ella møguleikanum hjá fyritøkum at virka um landamørk í Norðurlondum.

Tað eru ongar kendar marknaforðingar viðvíkjandi avgerðum um tilhaldi, uppihaldsforboð og burturvísing.

Marknaforðingar koma vanliga av, at lóggávan í londunum kring okkum og okkara lóggáva ikki er samskipað. Eru skipanirnar í londunum ikki samskipaðar, kunnu verða krøv í lóggávuni, sum hava við sær óhepnar og ótilætlaðar avleiðingar.

Tað verður mett, at lógaruppskotið ikki elvir til nýggjar marknaforðingar, av tí at talan er um avgerðir, sum bara hava gildi í Føroyum.

Uppskotið hevur ikki við sær marknaforðingar og tarnar flytføri hjá tí einstaka borgaranum ella ávirkar umstøðurnar hjá fyritøkum at virka um landamørk millum Føroyar, Danmark og Grønland.

**Revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ásetingar sum gera inntriv í rættindi hjá fólki. Hetta eru ásetingarnar um uppihaldsforboð og burturvísing. Mett verður at treytirnar fyri at taka avgerð um hesi inntriv ger, at inntrivini verður mett at standa í mát við lógarbrotið og við endamálið í lógini.
Sí meira um hetta frammanfyri undir 2.2 og 3.2 og seinni undir partinum um tvørgangandi millumtjóðasáttmálar.

**Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skatt ella avgjøld.

**Áleggur lógaruppskotið fólki skyldur?**
Lógaruppskotið leggur ikki skyldur á fólk, so sum upplýsingarskyldu, skrásetingarskyldu ella t.d. krøv um loyvi.

**Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur?**
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til nakran landsstýrismann.
Í § 11 er ásett, at tá løgreglan tekur avgerð um at vísa einum persóni úr heimi sínum, skal viðkomandi kommuna hava fráboðan um hetta. (DK-uppskot nr. 3.8.2)

**Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum. (Talvan)**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | **Nei** | **Nei** | **Nei** | **Ja** | **Nei** |
| Umsitingarligar avleiðingar | **Nei** | **Nei** | **Nei** | **Ja** | **Nei** |
| Umhvørvisligar avleiðingar | **Nei** | **Nei** | **Nei** | **Nei** | **Nei** |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | **Ja** | **Nei** | **Nei** | **Nei** | **Nei** |
| Sosialar avleiðingar | ////////////////////////////////////////////////// | | **Nei** | **Nei** | ////////////////////// |

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

**Til § 1**
Greinin allýsir, hvat eitt tilhald er, og hvat tað er fyri atburður, sum undir revsiábyrgd kann forbjóðast við einum tilhaldi.

Tað verður skotið upp at broyta tilhald frá at vera eitt forboð móti at valda øðrum persóni ónáðir, til at vera eitt forboð móti í útgangsstøðinum einum og hvørjum sambandi. Hendan nýggja uttanveltaða lýsingin av tilhaldi er ein einfaldsgering, sum hevur bæði hugsjónarligan og roynveruligan týdning, tí tað merkir, at tá brot verður staðfest á eitt tilhald, er tað ikki longur neyðugt at sanna, at sambandi veldur øðrum persóni ónáðir. Hinvegin merkir tað eisini, at um eitt tilætlað samband skal vera órevsivert, so er tað neyðugt, at tað verður mett, at sambandið av serligu orsøkum hevur verið heimilað. Sí eisini § 13.

Sambært § 1 er tilhald eitt revsiálagt forboð um at leita upp ein annan persón antin persónliga, munnliga ella skriftliga, undir hesum eisini við elektroniskum samskifti, ella á annan hátt at seta seg í samband við ella elta ein annan.

Greinin fevnir í fyrsta lagi um *samband*:
Sambært greinini er eitt og hvørt samband í útgangsstøðinum bannað. Sambært § 13 fevnir tilhald tó ikki um samband, sum av serligum orsøkum má metast at vera heimilað.

§ 1 og § 21 í lógaruppskotinum um revsing fyri brot á tilhald koma í staðin fyri galdandi áseting í § 265 í revsilógini. Eftir § 265 er revsingin sekt ella fongsul upp í 2 ár, um ein persónur veldur øðrum persóni ónáðir, hóast løgreglan frammanundan hevur givið hesum ávaring (tilhald) um at troðka seg inn á, forfylgja ella við skrivligum áheitanum ella á annan hátt at gera seg inn á ein annan. Tað, at brot á tilhald framyvir ikki verður brot á revsilógina, merkir ikki, at fatanin av álvarseminum av slíkum lógarbrotum er broytt.

Sambandið, sum verður forbjóðað, er í minsta lagi tað, sum eftir galdandi reglum er galdandi fyri tilhald. Tað er persónligar, munnligar ella skriftligar áheitanir. Sambært uppskotnu ásetingini verður tað við tilhaldi eisini bannað á annan hátt at seta seg í samband við hin partin. Tað merkir, at eisini áheitanir gjøgnum elektroniskt samskifti, tvs. við at brúka telefoni og internet o.a. koma undir bannið, undir hesum eisini teldubræv, sms ella boð gjøgnum sosial netverk sum Facebook ella Twitter.

Samband kann koma fyri á ymiskan hátt, og tað er eftir hesi ásetingini avgerandi, um atferðin, sum talan er um, veruliga kann roknast at vera ein áheitan ella samband frá kærda til órættaða. Hinvegin er tað ikki avgerandi, um sambandið er beinleiðis. Um t.d. eini boð gjøgnum facebook ikki beinleiðis eru stílaði til tann, sum verður plágaður, er ikki avgerandi. Boðini skulu haldast í veruleikanum at vera stílaði eisini til tann plágaða og ikki einans til onnur, eins og brotsmaðurin má hava ætlað, at boðini skulu vera ein áheitan til tann plágaða.

Greinin fevnir eisini um onnur sløg av áheitanum (sambandi), sum eftir rættarsiðvenju er fevnt av § 265 í revsilógini, undir hesum at standa beint uttanfyri húsini hjá órættaða, at geva ella senda blómur og heilsanir gjøgnum útvarpssendingar.

Greinin fevnir í øðrum lagi um *elta*: (dk:følge efter)
Tað kann vera til ónáðir, um ein persónur eltir ein annan uttan at koma heilt nær, soleiðis at atferðin ikki ella ikki við vissu kann metast sum samband. Slíkt atferð kann eftir umstøðunum vera eins tyngjandi sum vanligt samband. Ásetingin í § 1 fevnir tí umframt samband eisini, at ein persónur eltir ein annan persón. Tað má vanliga verða eitt krav, at viðkomandi er sjónligur fyri órættaða.

Tilhald kann avmarkast til forboð fyri ávísum slagi av framferð ella áheitanum o.a.

Tilhald kann verja privatpersónar, stovnar, virkir og almennar myndugleikar, um talan er um ein ítøkiligan persónskara.

**Til § 2.**
Í hesi greinini verða treytirnar ásettar, sum skulu verða loknar, fyri at tað kann verða givið tilhald. Grein 2 inniheldur tvær reglur um *tilhald.*

Í ***§ 2, stk. 1*** er vanliga ásetingin um tilhald.

Í *§ 2, stk. 1, nr. 1* verður lýst, hvat tað er fyri viðurskifti, sum kunnu hava við sær, at tilhald verður givið. Ásett er at tilhald kann verða givið grundað á, at ein persónur antin a) hevur volt øðrum persóni ónáðir við at forfylgja ella órógva hann, soleiðis sum nevnt er í § 1, ella b) hann ímóti hesum persóni hevur gjørt annað revsivert, sum kann javnmetast við ónáðir.

Eftir *§ 2, stk. 1, nr. 1, litra a* kann tilhald verða givið, tá viðkomandi hevur volt øðrum persóni ónáðir. Við ónáðir verður skilt, at tann kærdi er sekur í at hava volt øðrum persóni ónáðir við at forfylgja ella órógva hann, soleiðis sum nevnt er í § 1. Sambært siðvenjuni hjá løgregluni higartil verður hóttan um einfaldan harðskap, sum ikki er fevndur av § 266 í revsilógini um hóttanir, og sum verður sett fram móti órættaða, hildin at valda øðrum ónáðir. Tað er tí ikki í § 2, stk. 1, nr. 1 sett inn ein serlig áseting um hóttan um einfaldan harðskap, soleiðis sum tað er í § 8, nr. 1 um burturvísing.

Avgerðin um talan er um at valda øðrum persóni ónáðir við at forfylgja ella órógva hann, soleiðis sum nevnt er í § 1 skal framhaldandi takast grundað á eina ítøkiliga meting av øllum roynveruligu og rættarligu viðurskiftunum í málinum. Onáðir kann vera t.d. íðuligar áheitanir ella aðrar gerðir, sum ikki í sjálvum sær eru revsiverdar, men sum kennast ótýdligar og órógvandi orsakað av teirra mongd, innihaldi ella einum staðiligum ynski um at sleppa undan meira sambandi. Herumframt kann eisini eitt einstakt føri av ónáðum vera av so grovum slagi, at hetta í sjálvum sær kann hava við sær, at tilhald verður givið. Við allýsingini av tilhaldi í § 1 verða ónáðir voldar serstakliga við at forfylgja ella plága ein annan við persónligum, munnligum ella skrivligum áheitanum, øðrum sambandi ella við at elta ein annan. Tað fylgir av áherðsluni í § 1, at eisini áheitanir gjøgnum elektroniskt samskifti kunnu vera ónáðir, sum kann elva til, at tilhald verður givið.

Umframt ónáðir av tí slagnum, sum er fevnd av galdandi § 265 í revsilógini, kann tilhald eftir *§ 2, stk. 1, nr. 1, litra b* í øðrum lagi verða givið grunda á revsiverd viðurskifti. Sambært ásetingini er høvuðsreglan, at øll revsiverd viðurskifti, sum er rættaði móti tí, sum tilhaldi skal verja, kunnu elva til tilhald. Tað er tó ein treyt, at revsiverd viðurskifti, sum skulu vera grundarlag undir einum tilhaldi, skulu kunna javnsetast við vold av ónáðum, sum er fevnt av § 2, stk. 1, nr. 1, litra a. Hendan treyt kann vera lokin við, at støðan í roynd og veru er átøk revsiverdum førum av ónáðum sum t.d. húsaófriður ella revsiverdar hóttanir eftir § 266 í revsilógini. Treytin kann eisini vera lokin við revsiverdum viðurskiftum, sum eftir teimum ítøkuligu umstøðunum kunnu javnsetast við ónáðir. Sjálvt um stuldur vanliga ikki er fevnt av ásetingini, kann t.d. ein røð av stuldrum, hvørs endamál ikki er vinningur, men ágangur, eftir umstøðunum kunna grunda eitt tilhald. Slagið av revsiverdum viðurskiftum hevur eisini týdning fyri metingini av, um ábendingarkravið er lokið, sbrt. § 2, stk. 1, nr. 2.

Fráboðan um tilhald er treytað av, at kærdi longu er sekur í einum ella fleiri førum av ónáðum ella í einum ella fleiri revsiverdum viðurskiftum. Tað ber tí ikki til at geva tilhald í teimum førum, har onki er farið fram millum partarnar, men har annar parturin heldur, at hin parturin møguliga onkuntíð seinni fer at gera okkurt, sum kann geva grund fyri at geva tilhald. Eisini roynd at valda einum øðrum ónáðir kann vera partur av grundarlagnum fyri at boða frá tilhaldi. Hinvegin er tað ikki neyðugt, at hendingarnar eru meldaðar til ella eftirkannaðar av løgregluni. Hevur løgreglan kortini fyrr verið uppi í málinum orsakað av hendingunum, vil tað ofta vera serligur tørvur fyri at geva eina ávaring. Hetta er serstakliga galdandi í teimum førum, har tað fyrr er noktað at ganga eini umbøn um ávaring á møti, og har tað samstundis er upplýst pørtunum, at málið kann takast upp aftur, um nýggjur ágangur fer fram.

Løgreglan eigur ikki at vera ov afturhaldandi við at geva tilhald í ivaførum. Hevur órættaða t.d. greitt givið til kennar, at hon ella hann ikki ynskir samband við viðkomandi, kunnu seinni áheitanar grunda tilhald, eisini hóast tað ikki er talan um áheitanir í stórum tali. Tað er tó ikki nøkur treyt fyri at geva tilhald, at órættaða hevur givið til kennar, at hon ella hann ikki ynskir samband, undir hesum tá tað ikki er ein rímilig orsøk til samband, t.d. tá kend fólk verða forfylgd av persónum, sum tey ikki kenna. Forfylgdir persónar eru sostatt ikki noyddir til at svara áheitanum frá einum tráfylgjara.

Tilhald verður sambært siðvenju serliga brúkt í hesum førum:

- Tilburðir í samband við samlív, har annar parturin hevur framt harðskap ella annan ágang á hin partin.
- Tilburðir í samband við samlív, har ónáðir verða voldar í samband við samlívsslit, vanliga sum eyðmýkjandi áheitanir.
- Alment sett starvsfólk, sum koma undir ágang av persónum, sum tey eru komin í samband við í arbeiðnum.
- Bólkar av persónum, sum ikki eru partar av einum almennum virksemi, t.d. starvsfólk í eini privatum virki.
- Kend fólk, sum verða forfylgd
- Í øðrum førum, t.d. grannaklandur og ágangur framdur av sálarsjúkum persónum orsakað av sjúkuni
- Tráfylging, sum er miðvís og áhaldandi forfylging ella ágangur. Tráfylging vil vanliga koma fyri sum frábrigdi av einum ella fleiri av teimum frammanfyri nevndu hendingum

Persónar, sum mugu metast at vera fevndir av § 16 ella § 69 í revsilógini, kunnu fáa tilhald.

Ásetingin í § 2, stk. 1, nr. 1 setir krav til styrkina av illgrunanum um, at tað er volt øðrum persóni ónáðir ella er framt eitt revsivert brot móti einum øðrum (illgrunakrav). Sambært ásetingini skal tað vera grundaður illgruni. Talan um sama minstakrav sum fyri varðhaldsfongsling, sbrt. rættargangslógini § 762, stk. 1, og rættarvenja viðvíkjandi varðhaldsfongsling eftir hesi ásetingini kann vera vegleiðandi.

Eftir *§ 2, stk. 1, nr. 2* krevur tilhald eisini, at tað eru ávísar orsøkir eru at halda, at hann framhaldandi fer at volda hinum ónáðir, soleiðis sum nevnt er í nr. 1. Greinin ásetir tær umstøður, sum kunnu vera grundarlag fyri tilhaldi (ábendingarkrav).

§ 2, stk. 1, nr. 2 svarar í høvuðsheitum til § 762, stk. 1, nr. 2 í rættargangslógini, bæði viðvíkjandi innihaldinum av ábendingini (vandin fyri endurtøku) og tess grundarlagi (ávísar orsøkir). Rættarvenjan viðvíkjandi hesi greinini kann tí vera vegleiðandi til tulking av greinini í uppskotinum.

Tilhald vil tó sambært sínum endamáli vera eitt inntriv, sum skal vera við til verja tann, sum tilhaldið skal vernda, móti meira ágangi o.a., og tað er ein fyritreyt, at reglan í samband við tilhald verður brúkt við fyriliti at teimum serligu viðurskiftunum, sum eru tengt at tilhaldsmálum. Hetta inniber m.a., at treytin um endurtøkuvanda her í størri mun kann vera lokin, sjálvt um tað bara eru upplýsingar um fáar ella møguliga bara eina einstaka hending, eins og tað ofta vil vera talan um hendingar, sum ikki hava elvt til revsing, undir hesum ein enn ikki dømd hending.

Í teimum førum har ónáðir verða voldar við áheitanum, sum ikki í sjálvum sær eru revsiverdar ella hóttandi, órógvandi, vanærandi, likamliga ágangandi ella líknandi, og har tað serstakliga er talið av áheitanum, sum ger, at tær kennast ódámligar ella órógvandi, skal tað vanliga vera fleiri føri av ónáðum, og sum eru farin fram í eina ávísa tíð, áðrenn tilhald verður givið. Tað má eisini takast atlit at sannlíkindunum fyri, at ónáðirnar halda á, um tað ikki verður lagt uppí. Í tí metingini kann takast við m.a. ætlanin hjá kærda við áganginum og slagi av ágangi. Um áheitanirnar eru uttan rímiliga orsøk, t.d. eftir at hin parturin greitt hevur givið til kennar, at hon ella hann vil sleppa undan at hava samband, kann tað vanliga verða givið tilhald eftir ásetingini. Sum nevnt frammanfyri viðvíkjandi § 2, stk. 1, nr. 1 er tað í hesum førum ikki neyðugt, at talan skal vera um eitt størri tal av áheitanum. Hetta er ein avleiðing av, at hvør einstøk nýggj áheitan vísir viljan hjá viðkomandi um ikki at lata við seg koma ynskið hjá meldaranum at fáa frið.

Treytin í nr. 2 kann vera lokin við, at tað má metast, at viðkomandi fer at gera revsivert brot ella volda einum øðrum ónáðir. Tað er í tí sambandi ikki neyðturviliga avgerandi, at eitt fyrri brot var eitt revsivert brot ella føri av ónáðum, sum ikki í sjálvum sær er revsivert.

Í ***§ 2, stk. 2*** er eina serliga regla um tilhald.

Eftir hesi reglu kann tilhald verða givið í førum, har tað er framt groft persónsvandamikið lógarbrot. Tað er í fyrsta lagi ein treyt, at tað er grundaður illgruni um, at viðkomandi hevur framt brot á ásetingarnar í revsilógininum um dráp, rán, frælsistøku, harðskap, eldáseting, neyðtøku ella annað kynsligt brotsverk ella roynt at gera eitt av nevndu brotsverkunum, sbrt. *§ 2, stk. 2, nr. 1*. Í øðrum lagi er tað ein treyt, at órættaði ella teirra næstringar í mun til grovleikan av brotsverkinum ikki eiga at skulu finna seg í at hava samband o.a. við viðkomandi, sum ásett í § 1, sbrt. § 2, stk. 2, nr. 2. Eftir greinini kann tilhald verða givið í teimum førum, har kærdi hevur framt eitt so groft brotsverk móti einum persóni, at órættaði ikki skal tola áheitanir frá kærda, óansæð um tað annars eru ítøkiligar orsøkir at halda, at viðkomandi aftur fer at gera seg inn á órættaða ella teirra næstingar.

Mótsett vanligu regluni í § 2, stk. 1, nr. 1, eru í hesi ásetingini ikki onnur krøv enn brotverkskravið, tí tað verður ikki sett nakað krav um ónáðir annars ella endurtøkuvanda. Endamálið við ásetingini er at veita persónum, sum hava vera fyri persónsvandamiklum brotsverki, og teirra næstringum eina víðkaða vernd í mun til galdandi rætt.

Eftir ásetingin kann tilhald verða givið, um tað er grundaður illgruni um, at viðkomandi hevur framt dráp, rán, frælsistøku, harðskap, eldáseting, neyðtøku ella annað kynsligt brotsverk ella roynt at gera eitt av nevndu brotsverkum.

Spurningurin um eitt brotsverk í tí einstaka førinum er fevnt av ásetinginum, valdast um brotsverkið er so groft, at órættaði ella næstringarnir ikki skal tola samband o.a. við brotsmannin. Tað vil vera treytað av eini ítøkiligari meting av brotsverkinum og teimum umstøðum, sum tað er framt undir, undir hesum serstakliga hvat trýst órættaði og næstringarnir hava verið undir. Íblástur til uppreksanina av brotsverkum er fingin frá § 68 a, stk. 2 í revsilógini. Tað skal tó verða undirstrikað, at brúkið av hesi regluni er treytað av eini sjálvstøðugari meting av grovleikanum í mun til atlitið, sum er ásett í uppskotinum í § 2, stk. 2, nr. 2. Serstakliga grovar tilburðir við harðskapi ikki einans sambært § 245 í revsilógini, men eisini sambært § 244 í revsilógini, kunnu eftir umstøðunum vera fevndir av ásetingini. Brúk av ásetingini er treytað av, at talan er um brotsverk, sum í sjalvum sær hevur við sær eina longri treytaleysa fongsilsrevsing.

Sum tað sæst í ásetingini, kann tilhald eisini verða givið til frama fyri næstringar hjá órættaða. Tað kann t.d vera, tá eitt barn hevur verið fyri einum álvarligum harðskaps- ella kynsligum brotsverki, og har annar av foreldrunum ynskir tilhald, møguliga saman við einum tilhaldi í mun til barnið. Ásetingin kann eisini brúkast í førum við drápi, ella har órættaði er deyð/-ur í samband við ella í framhaldi av brotsverkinum, antin orsakað av hesum ella av aðrari orsøk.

Um grundaðan illgruna verður víst til viðmerkingarnar til § 2, stk. 1, nr. 1, sum standa frammanfyri.

Eins og tað hevur verið galdandi higartil, er tað ein treyt fyri at geva tilhald, at partanir ikki - sjálvboðnir – liva saman. Tað hevur ongan týdning, um partarnir eru skildir ella sundurlisnir ella hava tikið rættarlig stig til hetta, men samlívið millum partarnir skal vera hildið uppat, tá tilhald verður givið, og tað skal ikki vera væntandi, at tey finna saman aftur.

**Til § 3.**
Við hesari ásetingini verður sett inn ein vanlig regla um *uppihaldsforboð (landafrøðiliga ásett tilhald).* Uppihaldsforboð er allýst sum eitt forboð undir revsiábyrgd at uppihalda seg ella ferðastí á einum nærri tilskilaðum øki nærhendis bústaði, arbeiðsstaði, útbúgvingarstaði ella uppihaldstaði hjá einum øðrum persóni, ella nærhendis øðrum staði, har tann órættaði ofta ferðast.

Tað er skotið upp, at tilætlað brot á uppihaldsforboð eftir § 3 á sama hátt sum tilhald verður revsað við sekt ella fongsul upp í 2 ár, sbr. § 21.

Eitt uppihaldsforboð merkir, at kærdi fær forboð fyri at uppihalda seg ella koma í eitt nærri tilskilað øki nærhendis bústaði, arbeiðsstaði, útbúgvingarstaði ella uppihaldstaði hjá einum øðrum persóni, ella nærhendis øðrum staði, har tann órættaði ofta ferðast. Endamálið er at seta í verk ein trygdargeira fyri tann, sum uppihaldsforboðið skal verja, soleiðis at man kann avmarka ótryggleikan hjá persónum, sum hava verið og framvegis eru undir stórum trýsti orsakað av grovum ella tíðum endurtakandi førum av ónáðum, ella orsakað av at eitt tilhald ikki verður virt. Samstundis er uppihaldsforboð eitt týdningarmikið stig á leiðini til veruliga at fyribyrgja meira ágang á tann, sum uppihaldsforboðið skal verja.

Landsfrøðiliga økið, sum forboðið skal fevna um, skal lýsast so nágreiniliga sum gjørligt í avgerðini, undir hesum t.d. við at brúka kort yvir økið. Máliskan “nærhendis” skal verða skilt út frá, at uppihaldsforboð er eitt munandi inntriv í ferðafrælsi hjá tí kærda persóninum. Tað eigur tess vegna at vera eitt minni øki, har órættaði ofta ferðast. Onnur øki enn tey serstakt nevndu kunnu t.d. vera ein sjálvtøkuhandil ella ítróttaøki o.a., har órættaði javnan kemur.

Tann neyvara uppsetingin av økinum skal í hvørjum føri sær gerast út frá eini ítøkiligari meting, undir hesum við virðing fyri lutfalsmeginregluni, sbr. § 12.

Tað er ikki skotið upp at seta ávíst mestamál fyri landsfrøðiligu víddina á einum uppihaldsforboði. Víddin á einum landafrøðiligum uppihaldsforboði er tengt at, hvussu landslagi er háttað, og hvussu viðurskiftini eru millum partarnar. Í tætt bygdum øki, sum t.d. einum býi ella størri bygd, kann endamálið við uppihaldforboðnum røkkast við at lata uppihaldsforboðið fevna um eitt minni øki. Hetta fylgir eisini av lutfalsmetingini, sum skal gerast sambært § 12. Hinvegin kann eitt uppihaldsforboð í einum fábýltum øki hava nógv størri í vídd, um tað ítøkiliga ikki er nakað, sum tala ímóti tí.

Viðurskiftini hjá pørtunum hevur eisini ávirkan á metingina. Búgva partarnir nærhendis hvørjum øðrum, má forboðsøkið laga seg eftir hesum, soleiðis at hóskandi fyrilit verða tikið ferðafrælsi hjá kærda, sbr. § 12 um lutfall. Hinvegin kann tað tala fyri at toyggja eitt uppihaldforboðið til eitt størri øki, um órættaði er fluttur úr sínum bústaðarøki higartil fyri at sleppa undan sambandi við kærda, og tann kærdi ikki hevur nakað tilknýti til núverandi øki ella annars hevur rímiliga orsøk til at koma í økið.

Tá forboðsøki verður sett upp, eigur tað eisini at verða haft fyrilit fyri almennu samferðsluviðurskiftunum, t.d. størri ferðsluvegir, havnir, sum kærdi hevur ein lógligan áhuga at ferðast á.

Við máliskuni “uppihalda sær ella ferðast” verður hugsa um eina og hvørja likamliga hjástøðu innan fyri avmarkaða økið, undir hesum at ganga ígjøgnum eitt øki. Eitt uppihaldsforboð vil sum høvuðsregla hava við sær, at ein og hvør hjávera í avmarkaða økinum er eitt brot, hóast talan bara er um heilt stutt uppihald. Eitt uppihaldsborð er sostatt eisini eitt forboð at búseta seg í økinum.

Sambært § 13 fevnir uppihaldsforboð ikki tó ikki ferðslu ella uppihald, sum av serligum orsøkum má metast at vera heimilað.

**Til § 4.**
Í hesi greinini verða treytirnar ásettar, sum skulu verða loknar, fyri at tað kann verða givið uppihaldsforboð.

Upphaldforboð kann einans verða givið, um treytirnar fyri at geva tilhald eru loknar, sbrt. § 2. Tað er ikki nøkur treyt, at kærdi hevur fingið tilhald. Uppihaldsforboð kann verða givið samstundis sum tilhald ella uttan tilhald. Endamálið við uppihaldsforboði vil vanliga hava við sær, at tilhald verður givið samstundis sum uppihaldsforboðið, um viðkomandi ikki frammanundan hevur fingið tilhald.

Sambært *§ 4, stk. 1* er tað eisini ein treyt, at viðkomandi ímóti einum øðrum persóni hevur framt tíðum endurtakandi ónáðir, tilætlað hevur brotið tilhald eftir § 1 ella ímóti hesum hevur framt brot, sum er fevnt av § 2, stk. 2, ella § 8, nr. 1. Tað er ein fylgja av tilvísingini til § 2, at illgrunakravið er grundaður illgruni.

Sambært 1. liðið í ásetingini kann tíðum endurtikin brot eftir § 2, stk. 1, nr. 1 hava við sær uppihaldsforboð.

Tíðum endurtikin brot er, tá talan er um ávíst tal av brotum, sum eru framd innan eitt styttri tíðarskeið. Tað kann vera føri av ónáðum, sum ikki í sjálvum sær eru revsiverd, tvs. ónáðir, sum eru voldar innan, at tilhald varð givið, eftirsum ónáðir voldar aftaná, at tilhald er givið, eru revsiverd sum brot á tilhaldið. Tað kann eisini snúgva seg um sjálstøðug revsiverd brot,

sum kunnu javnsetast við ónáðin. “Tíðum” endurtikin brot er eitt liðiligt metingarstøði. Nøkur fá brot eru ikki nokk, men metingin vil vera treytað av grovleikanum av brotunum og tíðarbilið millum hesi.

Sambært 2. liðið í ásetingini verður ásett, at tað eisini kann verða givið uppihaldsforboð, um viðkomandi tilætlað hevur brotið tilhald eftir § 1. Tað er nóg mikið, at tað er grundaður illgruni um, at tilhaldið er brotið tilætlað, og uppihaldsforboð kann sostat verða givið óheft av, um viðkomandi er revsaður fyri brot á tilhaldið.

Í 3. liðið í ásetingini verður ásett, at tað kann verða givið uppihaldsforboð, tá tað er grundaður illgruni um  um lógarbrot, sum er fevnt av § 2, stk. 2 (grov persónsvandamikil brotsverk) ella § 8, nr. 1 (lógarbrot, sum kunnu hava við sær burturvísing). Tað skal í báðum førast gerast ein ítøkilig meting av, um lógarbrotið er so groft, at brotið hevði havt við sær antin tilhald eftir § 2 , stk. 2 ella burturvísing eftir § 8, nr. 1. Sambært ásetingini skal talan vera um lógarbrot. Hóttanir um einfaldan harðskap kunnu einsamallar vera grundarlag fyri uppihaldforboði eftir 3. liði í ásetingini. Hóttan um einfaldan harðskap er ónáðir ella brot á samveru eftir § 1, sum kann vera partur av § 4, nr. 1, 1. og 2. liður, um ávikavist tíðum endurtikin føri av ónáðum og brot á tilhald.

Í teimum førum har tilhald kann gevast til frama fyri næstringarnar hjá órættaða, sbrt. § 2, stk. 2, kann tað eisini verða givið uppihaldsforboð til frama fyri næstringarnar hjá órættaða, um treytirnar annars eru loknar.

Sambært *§ 4, nr. 2* er tað at enda ein treyt fyri upphaldsforboði bæði sambært nr. 1, 1. og 2. lið,  at tilhald sambært § 1 ikki kann roknast at vera nóg mikið at verja tann, sum tilhaldið skal vernda. Uppihaldforboð eigur einans at verða brúkt í teimum førum, har tað er serliga neyðugt, og har vanligt tilhald, sbrt. § 1 ikki verður mett at vera nóg mikið í mun til at verja tann, sum tilhaldið skal vernda. Um tey viðkomandi førini av ánáðum eru framd við telefoniskum ella elektroniskum sambandi, er uppihaldsforboð vanliga ikki viðkomandi.

**Til § 5.**
Í *§ 5, 1. pkt.* verður ásett, at tilhald verður givið fyri eitt ávíst tíðarskeið upp í 5 ár. Hetta er tað sama, sum er ásett í galdandi áseting í § 265, 2. pkt í revsilógini, har tilhald hevur gildi í 5 ár, men kann sambært rættarvenju avmarkast til eitt styttri tíðarskeið.

Í *2. pkt.* verður skotið upp, at uppihaldsforboð skal hava styttri gildistíð enn tilhald, við atliti at uppihaldsforboð er eitt størri inntriv mótvegis tí, sum forboðið er vent ímóti enn eitt tilhald. Tað verðuir skotið upp, at uppihaldsforboð kann gevast fyri eitt ávíst tíðarskeið upp í 1 ár.

Eitt tilhald ella uppihaldsforboð kann frammanundan avmarkast til eitt styttri tíðarskeið.

Fáa partarnir í lag eina friðarligar samveru, fellur tilhaldið ella uppihaldsforboðið burtur, hóast samveran einans er í eina stutta tíð. Hetta er ikki galdandi, um samveran verður noydd inn á tann, sum fyriskipanin skal vernda. Tilhald og uppihaldsforboð kann eisini verða tikið aftur, um tann, sum tilhaldið ella uppihaldsforboðið skal verja, biðjur um tað, uttan so at løgreglan metir, at almenn fyrilit krevja, at tilhaldið ella uppihaldsforboðið verður varðveitt.

Freistin uppá ávikavist 5 ár og 1 ár kann framleingjast við at geva nýtt tilhald ella uppihaldsforboð áðrenn, ella tá freistin er farin, um treytirnar fyri at geva tilhald og uppihaldsforboð er til loknar um hetta mundið.

Um viðkomandi verður fríkendur fyri eina gerð, har illgrunin um gerðina hevur verið partur av grundarlagnum fyri einum tilhaldi ella uppihaldsforboði, eigur tilhaldið ella

uppihaldsforboðið at vera tikið av. Hetta er tó ikki galdandi, um tað í aðramáta er grundarlag fyri fyriskipanini.

**Til § 6.**
Eftir hesi ásetingini kann eitt tilhald ella uppihaldsforboð víðkast til at fata um ein persón í húsahaldinum hjá viðkomandi, undir hesum eitt barn ella ein hjúnarfelagi, um tað verður hildið at vera neyðugt við atliti at endamálinum við tilhaldinum ella uppihaldsforboðnum. Eitt tilhald ella uppihaldsforboð kann eftir umstøðunum víðkast til at fata um fleiri persónar í húsarhaldinum hjá viðkomandi, um tað í mun til hvønn einstakan av hesum má metast at vera neyðugt við atliti at endamálinum við tilhaldinum ella uppihaldsforboðnum.

Ásetingin merkir, at tilhald ella uppihaldsforboð kann víðkast til eisini at fata um serbarn hjá órættaða, um tann kærdu hevur framt brot, sum óansæð um tey eru ætlaði móðir ella faðir barnsisns, ger, at tað er nærliggjandi at halda, at framhaldandi føri av ónáðum o.a. eisini fer at ganga út yvir barnið, ella at kærdi fer at forfylgja ella órógva órættaða gjøgnum barnið. Í tann mun tað ikki er samverurættur til felags børn, kann tilhald móti at seta seg í samband við felags børn eisini koma upp á tal. Um samverurættur er, má eitt tilhald avmarkast til forboð móti sambandi, sum røkkur út um tað, sum fylgir av samverurættinum.

Tað er treyt fyri at brúka ásetingina, at treytirnar fyri tilhald ella uppihaldsforboð eru loknar, og at tað verður nett neyðugt við atliti at endamálinum við tilhaldinum ella uppihaldsforboðnum at víðka fyriskipanina til at fata persón í húsarhaldinum hjá viðkomandi, undir hesum út frá lutfalsmetingini, sbrt. § 12.

Ásetingin í uppskotinum hevur ta fyritreyt, at tilhald verður givið í mun til tann persón, sum er beinleiðis órættaður við tí ella teimum førum av ónáðum, sum grunda tilhaldið. Í førum har tað ikki verður givið tilhald í mun til tann beinleiðis órættaða, kan tað í samband við grov brotsverk kunnu gevast tilhald til frama fyri næstringar eftir serligu regluni í § 2, stk. 2, og eftir umstøðunum uppihaldsforboð eftir § 4.

**Til § 7.**
Burturvísing kann allýsast sum eitt forboð undir revsiábyrgd fyri, at ein persónur eldri enn 18 ár í eitt nærri ásett og vanliga í eitt styttri tíðarskeið kann uppihalda seg í einum felags heimi, tvs. bústaðinum hjá húskinum hjá persóninum, uttan mun til rættarligu viðurskiftini hjá persóninum til húski og bústaðin. Ásetingin í § 7 staðfestir samsvarandi, at burturvísing merkir eitt forboð fyri at upphalda sæs í heimi sínum.

Máliskan "heim" merkir bústaðurin hjá viðkomandi persóni (sum samstundis er karmur um eina familju ella líknandi persónligan felagsskap, tvs. fyri eitt húski). Bústaður fevnir umframt t.d. eina íbúð ella sethús eisini um onnur tilhoyrandi rúm og grundøki, og við til heimið hoyrir eftir umstøðunum eisini vinnuhøli og – øki, sum hoyrir til bústaðin.

Uppihald merkir ein og hvør likamlig hjávera á viðkomandi staðnum. Ein burturvísing merkir sostatt, at øll hjávera í bústaðnum er eitt brot, uttan mun til um tað er eitt stutt uppihald. Ein burturvísing rúmar sostatt bæði eitt uppihaldsforboð og eitt atgongubann.

Tað er ein fyritreyt, at tann burturvísti skal hava atgongd til at koma eftir neyðugum persónligum ognarlutum í heiminum, sum í fyrstu syftu ikki eru tiknir við, t.d. neyðugan heilivág ella lutir, sum burturvísti tørvar fyri at kunna útinna sítt starv. Við heintan av

neyðugum lutum skal løgreglan fara við viðkomandi til bústaðin og vera hjástødd, meðan heintingin fer fram. Løgreglan eigur í hesum sambandi frammanundan heintingina at fráboða órættaða.

**Til § 8.**
Í hesi greinini verða treytirnar ásettar, sum skulu verða loknar, fyri at burturvísing skal henda.

Eftir *§ 8, nr. 1* er tað ein treyt, at tað er grundaður illgruni um, at viðkomandi móti einum av húsfólki sínum hevur framt eitt av teimum nevndu brotsverkunum í revsilógini, sum sambært lógini kunnu hava við sær fongsul í 1 ár og 6 mánaðir (1. liður), ella at viðkomandi hevur havt eina atferð, sum aðramáta ber í sær eina hóttan um harðskap ímóti einum í húskinum (2. liður).

Ásetingin, *1. liður*, sum setir krøvini til slagi av tí brotsverki, sum kann hava við burturvísing (brotsverkskravið). Tað er, mótsett 2. liði í ásetingini, ein treyt, at tað skal vera talan um eitt longu framt (áleikandi) brotsverk.

Tað revsiverda brotið skal vera fevnt av einum ella fleiri av teimum revsilógarásetingum, sum nágreiniliga eru nevndar í § 8, nr. 1, 1. lið. Tað snýr seg um §§ 210, 213, 266 í revsilógini og ásetingarnar i kapittul 24-26, sum kann hava við sær fongsul upp í 1 ár og 6 mánaðar. Kjarnuøkið, har burturvísing verður brúkt, er sostatt harðligur og hóttandi atburður. Burturvísing kann tó eisini verða brúkt við t.d. kynsligum brotsverkum og ávísum brotsverkum í familjuviðurskiftum, undir hesum t.d. blóðskemd.

Tað er eisini ein treyt, at revsiverda lógarbrotið er framt móti einum av húsfólkinum. Í ivamálum, um talan er um eitt húski, er avgerandi fyri at hesi kunnu koma undir burturvísingsregluna, at búfelagsskapurin eftir eini heildarmeting kann javnsetast við ein familjufelagsskap. Burturvísing kann tí ikki einans brúkast, um tað er ein maður sum fremur lógarbrót móti konu síni ella samlivara, men t.d. eisini um talan er um eina kvinnu ella vaksin børn og aðrir persónar í einum húski.

Ásetingin, 1. liður, setir krav til styrkina av illgrunanum um, at tað er framt eitt revsivert brot móti einum øðrum (illgrunakrav). Sambært ásetingini skal tað vera grundaður illgruni. Talan er um sama minstakrav sum fyri varðhaldsfongsling, sbrt. rættargangslógini § 762, stk. 1, og rættarvenja viðvíkjandi varðhaldsfongsling eftir hesi ásetingini kann vera vegleiðandi. Kravið um grundaðan illgruna merkir vanliga, at tað má vera óvildarligt upplýsingartilfar, sum við munandi styrki vísir á viðkomandi sum sekan. Um hetta er støðan í tí ítøkiliga førinum er tengt at eini ítøkiligari meting, sum kann vera ymisk.

Í ásetingini, 2. liður, sæst, at tað eisini kann vera talan um burturvísing, um viðkomandi hevur havt eina atferð, sum aðramáta er ein hóttan um harðskap móti persóni í húskinum.

Ásetingin kemur afturat kravinum um áleikandi brotsverk og gevur møguleika fyri, at burturvísing á kjarnuøkinum – harðskapsbrotsverkini – kann vera í førum, har tað ikki er grundaður illgruni um, at tað áleikandi er framt eitt brotsverk. Ásetingin hevur við sær, at burturvísing eisini kann vera brúkt við hóttan um einfaldan harðskap eftir § 244 í revsilógini, uttan mun til at slíkar hóttanir sambært ásetingunum um hóttanir í revsilógini (§ 266) ikki í sjálvum sær eru revsiverdar. Neyvari virkisøkið fyri regluni í 2. liði má í aðrar mátar avgerast eftir teimum fyrilitum, sum er tengt at revsilógini § 266.

Kravið um, at fyritreytin fyri inntrivi er grundaður illgruni, er galdandi á sama hátt fyri 2. lið í ásetingini.

Sambært *§ 8, nr. 2* krevur burturvísing bæði eftir 1. og 2. liði í nr. 1, at tað eru ávísar orsøkir at halda, at viðkomandi við at uppihalda sær í heiminum fer at fremja eitt lógarbrot, sum er nevnt í nr. 1. Ásetingin ásetir tær umstøður, sum kunnu vera grundalagi fyri einum inntrivi sum burturvísing (ábendingarkravið).

Ásetingin svarar í høvuðsheitum til § 762, stk. 1, nr. 2 í rættargangslógini um varðhaldsfongsling, bæði viðvíkjandi innihaldinum av ábendingini (vandin fyri endurtøku) og tess grundarlagi (ávísar orsøkir). Rættarvenjan viðvíkjandi hesi greinini kann tí vera vegleiðandi til tulking av greinini í uppskotinum um burturvísing.

Burturvísing er kortini sambært sínum endamáli eitt inntriv, sum skal vera við til at fyribyrgja harðskapi í heiminum, og tað er ein fyritreyt, at reglan í samband við burturvísing verður brúkt við atliti at teimum serligu viðurskiftunum, sum eru tengt at brotsverkum í familjuviðurskiftum. Hetta merkir millum annað, at treytin um endurtøkuvandan í hesum førum í størri mun enn við varðhaldsfongsling, vanliga vil vera lokin, hóast tað einans eru upplýsingar um eina einstaka hending, undir hesum eina enn ikki dømda hending.

**Til § 9.**
Í vanligu málunum, har eitt burturvísingarmál verður byrjað orsakað av grundaðum illgruna um, at tann ágangandi persónurin hevur framt eitt av teimum revsilógarbrotum, sum eru nevnd í § 8, vil løgreglan við heimild í regluni í § 755, stk. 1 í rættargangslógini vanliga hava neyðuga grundarlagið fyri at handtaka viðkomandi. Í teimum serligu førunum har grundarlagið einans er, at viðkomandi hevur havt eina atferð, sum aðramáta er ein hóttan um harðskap móti persóni í húskinum, sbr. § 8, nr. 1, 2. lið, er tað ikki nakað grundalag fyri handtøku, av tí at viðkomandi tá ikki er undir illgruna fyri ein gerð, sum í sjálvum sær er revsiverd.

*§ 9, stk. 1* í uppskotinum gevur møguleika fyri, at løgreglan eisini í slíkum førum kann halda einum persóni aftur fyri at avhoyra viðkomandi o.a. og við tí í hyggju at forða ágangi, tá tað er rímilig orsøk til at halda, at persónurin hevur havt eina atferð, sum er ein hóttan um harðskap móti persóni í húskinum.

Burturvísing kann væntast at vera brúkt, tá tað longu er framdur ágangur ella hóttanir eftir § 266 í revsilógini. Roknast kann við, at hendan serreglan tí einans fer at verða brúkt í fáum førum.

Í *stk. 2, 1. pkt.* er ásett, at afturhald sambært stk. 1 skal fylgja vanligu reglunum um handtøku í rættargangslógini §§ 755-760, stk. 1.

Tilvísingin til § 760, stk. 1 í rættargangslógini hevur við sær, at viðkomandi skal leyslatast, so skjótt sum orsøkin fyri afturhaldinum ikki longur er til staðar. *Stk. 2, 2. pkt.* ásetir nágreiniliga, at viðkomandi skal leyslatast innan 24 tímar. Ásetingin hevur samstundis við sær, at løgreglan eigur at tryggja sær arbeiðsmannagongdir, sum ger tað møguligt at viðgera burturvísingarmál við neyðugum skjótleika.

Um viðkomandi verður fríkendur fyri eina gerð, har illgrunin um gerðina hevur verið partur av grundarlagnum fyri burturvísing, eigur burturvísingin at vera tikin av. Hetta er tó ikki galdandi, um tað aðramáta er grundarlag fyri fyriskipanini.

**Til § 10.**
Greinin ásetir, at tað skal setast ein freist fyri burturvísing, sum ikki kann fara út um 4 vikur.

*Stk, 2, 2. pkt.* gevur møguleika fyri, at ein avgerð um burturvísing kan framleingjast upp til 4 vikur í senn. Tað er ikki ásett nakað endaligt longstamark fyri eini burturvísinig.

Tað er ein fyritreyt fyri avgerð um framleingjan, at tær vanligu treytirnar fyri burturvísing framhaldandi eru loknar, sbr. § 8 í lógaruppskotinum. Lutfalsmeginreglan í § 12 vil við avgerð um framleingjan kunnu hava við sær, at tíðarbundna víðkanin av inntrivinum í sjálvum sær kann benda á at skerpa krøvini til grundarlagið fyri burturvísingini.

Ein burturvísing eigur at verða strikað, tá treytirnar fyri burturvísing ikki longur eru loknar. Tað at partarnir hava avgjørt at liva saman aftur, hevur sum høvuðsregla við sær, at burturvísingin heldur uppat. Um órættaði ikki sjálvboðin hevur uppafturtikið samlívið, eigur ein roynverulig uppafturtøka av samlívinum tó ikki at hava við sær, at burturvísingin heldur uppat. Í teimum førum har burturvísingin er orsakað av ágangi móti børnum, má ein uppafturtøka av samlívinum, sum partnarin tekur undir við, sum høvuðsregla heldur ikki hava við sær, at burturvísing heldur uppat. Um burturvísing er framd uttan umbøn, er tað høvuðsreglan, at tann burturvísti ikki hevur rætt til at uppihalda seg í bústaðnum, og løgreglan kann beinanvegin taka viðkomandi út úr bústaðnum. Spurningurin um týdningin av uppafturtøku av samlívinum má yvirhøvur avgerast eftir eini ítøkiligari meting.

Tað eigur at síggjast í avgerðini, nær freistin rennur út.

**Til § 11.**
Greinin ásetir, at sosialu myndugleikarnir skulu hava fráboðan um málið í seinasta lagi samstundis sum avgerð um burturvísing verður tikin.

*Stk. 1.* Við hesi ásetingini hevur Fútin eina rættarliga skyldu til at boða sosialu myndugleikunum frá burturvísingini. Fráboðanarskyldan er hjá Fútanum og skal síggjast í ljósinum av, at avgerðir um burturvísing vanliga hava uppruna í álvarsligum sosialum trupulleikum, samlívstrupulleikum, misnýtslutrupulleikum o.a. Í samband við burturvísing vil tað ofta vera tørvur á at veita sosialan stuðul til annan ella báðar partar, og tí eiga sosialu myndugleikarnir so tíðliga sum gjørligt at fáa fráboðan um vavið av trupulleikunum fyri at kunna seta í verk møguligar fyriskipanir.

*Stk. 2* ásetir, at skjøl og upplýsingar í málinum viðvíkjandi burturvísingini, undir hesum elektroniskt goymdar dátur, skulu víðarigevast til sosialu myndugleikarnar (sociale udvalg). Fútin hevur sostatt eisini rættarliga skyldu at víðarigeva upplýsingar og skjøl í málinum. Tey skjøl og upplýsingar, sum løgreglan skal geva víðari, skulu vera neyðug fyri viðgerðina av málinum hjá teimum sosialu myndugleikunum.

Tað kann vera talan um upplýsingar og skjøl bæði um tann burturvísta og tann persónin, sum verður búgvandi í felags heimi teirra. Tað vil serstakliga verða talan um upplýsingar og skjøl, sum hava samband við burturvísingarmálið, undir hesum sjálv avgerðin og grundgevingin fyri burturvísingini, umframt politifrágreiðingar og møguligar læknaligar upplýsingar.

Tað er ein fyritreyt, at Fútin sum høvuðsregla, áðrenn upplýsingar og skjøl verða víðargivin, roynir at fáa samtykki frá teimum íblandaðu persónunum, sum upplýsingarnir og skjølini viðvíkja.

**Til § 12.**
Sambært ásetingin mugu eitt tilhald, uppihaldsforboð og burturvísing ikki vera í ósamsvari við tað ólag, sum inntrivini skapa hjá tí, sum skal ganga undir tey, við fyrilitið fyri tí ella teimum, sum tey skulu verja, ella við slagi av atferðini, sum víst er. Tað skal sambært ásetingini gerast ein serstøk lutfalsmeting í mun til eitt tilhald, uppihaldsforboð og burturvísing við tí fyri eyga at staðfesta, um inntrivið er rímiligt.

Tað er ein fylgja av lutfalsmeginregluni, at veljast skal tað minst inntrívandi átakið, sum kann røkka endamálinum.

Tilhald vilja í flestu førum vera lutfalslig, tá tað sum høvuðsregla er eitt avmarkað ólag í viðurskiftunum hjá viðkomandi. Tað er sostatt ikki við hesi ásetingin ætlað nøkur avmarking í brúkinum av tilhaldi í mun til galdandi siðvenju.

Í samband við uppihaldsforboð má víddin av tí landafrøðiliga økinum í mun til bústað, arbeiðsstað, útbúgvingarstað o.a. hjá kærda ella støð, har kærdi hevur rímiliga orsøk at koma javnan, hava serstaka tyngd í lutfalsmetingini. Tað kann hava týdning fyri bæði spurningin um eitt uppihaldsforboð yvirhøvur skal gevast og um so er, víddina á økinum. Sí viðmerkingarnar til § 3.

**Til § 13.**
Í hesi ásetingini verður staðfest, at tilhald, uppihaldsforboð og burturvísing ikki fevnir um samband, uppihald ella gongd, sum av serligum orsøkum má roknast sum heimilað. Við hesi áseting verður skotið upp at gera undantak til tilhald eftir § 1, uppihaldsforboð eftir § 3 og burturvísing eftir § 7. Ásetingin hevur við sær, at tað áliggur viðkomandi sjálvum at gera sannlíkt, at samband o.a. hevur verið heimilað.

Sum dømi um samband, sum av serligum orsøkum má metast at vera heimilað, kann verða nevnd ein støða, har eitt felags barn áleikandi verður álvarsliga sjúkt, og har sum tað ikki eru onnur, sum hava møguleika fyri í nóg góðari tíð at koyra barnið á sjúkrahús, og har viðkomandi brýtur eitt tilhald, uppihaldsforboð ella burturvísing við at koyra barnið á sjúkrahúsið.

Eitt annað dømi kann vera tann støðan, at ein burturvístur fær loyvi til at heinta neyðugar ognarlutir í heiminum, sum í fyrstu syftu ikki eru tiknir við, t.d. neyðugan heilivág ella lutir, sum burturvísti tørvar fyri at kunna útinna sítt starv, sum ásett í avgerðini um burturvísing. Við heintan av neyðugum lutum skal løgreglan fara við viðkomandi til bústaðin og vera hjástødd, meðan heintingin fer fram. Løgreglan eigur í hesum sambandi frammanundan heintingina at fráboða órættaða.

Tað skal viðmerkjast, at í avgerðini um tilhald, uppihaldsforboð ella burturvísing kunnu verða gjørd undantøk frá forboðnum móti samband, uppihald o.a. Samband o.a sum er fevnt av slíkum undantøkum, sum er ein avmarking av vavinum við forboðnum, er ikki fevnt av forboðnum, uttan at hetta er orsakað av ásetingini í § 13.

**Til § 14.**
Eftir ásetingini kann avgerð um tilhald, uppihaldsforboð og burturvísing verða tikin, tá ein persónur, sum fyriskipanin skal verja, biðjur um tað, ella tá almenn atlit krevja tað. Kann tað

t.d. hugsast, at órættaði av ótta ikki torir at biðja um tilhald o.a., kann løgreglan sambært ásetingini taka stig til hetta.

Reglan eigur at verða avmarkað til hendingar, har tað er vandi fyri meira álvarsligum ágangi. Tað er ein fyritreyt, at hesin møguleikin verður spardur til tilburðir, har tað er munandi vandi fyri, at tann veikari parturin kemur undir álvarligan ágang, undir hesum harðskap ella neyðtøku, ella tað er vandi fyri ágangi móti børnum.

**Til § 15.**
Tað verður í § 15, stk. 1 skotið upp, at løgreglan í málum um tilhald, uppihaldsforboð og burturvísing vegleiðir partarnir um reglurnar í hesi lóg, tá høvi býðst til tess.

Við ásetingini verður tað undirstrikað, at løgreglan skal vegleiða kærara og kærda um reglurnar í hesi lóg, tá høvi býðst til tess. Tað valdast um metingina hjá løgregluni, um vegleiðing er neyðug. Vegleiðingin av kærda kann vera sum ein áminning. Við áminning skal skiljast, at løgreglan óformliga ávarar kærda um, at um ágangurin o.a. heldur á, fer tað at kunnu verða givið viðkomandi tilhald o.a., og at løgreglan upplýsir um avleiðingarnar av einum tilhaldi, uppihaldsforboði og burturvísing. Tað er ongin rættarvirknaður tengdur at eini áminning, og brot kunnu ikki revsast, men umstøðurnar kunnu vera partur í grundarlagnum fyri eini seinni avgerð um møguligt tilhald, uppihaldsforboð ella eina burturvísing.

Tað er ikki ein treyt fyri at taka avgerð um tilhald, uppihaldsforboð ella burturvísing, at kærdi frammanundan er vegleiddur um reglurnar sambært hesi ásetingini.

Ein áminning hevur serstakliga týdning í tveimum samanhangum. Í fyrsta lagi í teimum førum, har løgreglan kann staðfesta, at tað kann fara at vera tørvur á tilhaldi, uppihaldsforboði ella burturvísing, men har tað um hetta mundið ikki enn er heilt nøktandi grundarlag fyri at boða frá tilhaldi o.a. Í øðrum lagi kann ein áminnig vera viðkomandi, har tað er orsøk at halda, at tann kærdi vil broyta sína atferð orsakað av áminningini. Áminningar kunnu sostatt í slíkum førum ávirka kærda til at steðga ágangandi atburðinum fyrri, áðrenn tað er grundarlag fyri fyri at boða frá einum tilhaldi o.a.

Sambært hesi ásetingini eigur løgreglan at kanna, um málið kann enda uttan tilhald o.a. Løgreglan eigur sostatt at royna at fáa eina loysn í sátt og semju við vegleiðing, samrøðu og tilráðingum, til kærara og kærda, um tað eru líkindi til, at tvístøðan kann loysast á henda hátt. Hesin framgangsháttur kann minna um formliga seming, men er av heilt øðrum slagi, har løgreglumaðurin hevur ein virknan leiklut og m.a. kann verja tann veikara partin og tala hansara søk í mun til til hin partin. Løgreglumaðurin kann eisini koma við uppskotum til uppbyggjandi mátar at loysa framtíðar tvístøður. Framferðarhátturin er ikki hóskandi í øllum førum, t.d. tá annar parturin hevur framt harðskap móti hinum, ella har tann eini parturin hevur ein greiðan verndartørv, og at tað tess vegna ikki er grundarlag fyri at loysa tvístøðuna í sátt og semju, t.d. í tráfylgingarmálum.

*Stk. 2* ásetir, at avgerð um tilhald, uppihaldsforboð og burturvísing verður tikin av Fútanum.

Eftir *stk. 3* kann avgerðin hjá Fútanum kærast til ríkisadvokatin, hvørs avgerð er endalig innan fyrisitingin. Sí rættargangslógina § 100, stk. 3. Ásetingin er eisini galdandi fyri kærur frá órættaða um, at løgreglan ikki hevur játtað eini umbøn um tilhald, uppihaldsforboð ella burturvísing.

Kæra um tilhald, uppihaldsforboð og burturvísing hevur sum høvuðsregla ikki steðgandi virknað.

Viðmerkjast skal at sambært § 17, stk. 1 í uppskotinum, kann tann, sum fær uppihaldsforboð ella verður burturvístur, innan 14 dagar eftir at viðkomandi hevur fingið avgerðina fráboðaða, krevja, at avgerðin verður løgd fyri rættin.

Avgerð um uppihaldsforboð og burturvísing kann verða kravd løgd fyri rættin, sjálvt um viðkomandi ikki hevur troytt fyrisitingarligu kærumøguleikarnir.

**Til § 16.**
Sambært ásetingini skulu avgerðir um tilhald, uppihaldsforboð og burturvísing kunngerast fyri viðkomandi, sum við kunngeringini samstundis skal vegleiðast um rættin til at krevja avgerðina lagda fyri rættin. Avgerð um tilhald, uppihaldsforboð og burturvísing fær virknað frá kunngerðarmundinum, og samstundis byrjar freistin uppá 14 dagar at leggja avgerðina um uppihaldsforboð ella burturvísing at renna, sbr. § 17, stk. 1.

**Til § 17.**
Við *§ 17, stk. 1* verður skotin upp ein serliga skjótur og lættur møguleiki at rættarkanna uppihaldsforboð og burturvísing, soleiðis at tann persónurin, sum fær uppihaldsforboð ella verður burturvístur, kann krevja, at Fútin leggur avgerðina fyri rættin.

Eftir *stk. 2* hevur tann, sum krevur eina avgerð um uppihaldsforboð ella burturvísing lagdað fyri rættin (kærdi), skyldu til at upplýsa løgregluni ein bústað, sum innkalling til rættarfund kann sendast til. Upplýsingin skal gevast í seinasta lagi samstundis við umbøn um at leggja avgerðina fyri rættin. Tá fráboðan um rættarfundin er send til tann bústaðin ella tað telefonnummarið, sum kærdi hevur upplýst, er ein eginlig kunngering ikki neyðug.

Í samband við móttøku av eini umbøn um at royna málið í rættinum, eigur tað so vítt til ber at vera arbeiðsmannagongdir, sum ger tað møguligt at viðgera mál við neyðugum skjótleika, og reglan í stk. 2 skal tí fyrst og fremst tryggja ein lagaligan og hóskandi mannagongd við innkalling til rættarfund í samband við rættarkanning eftir § 19.

Rættarvirknaðurin av, at kærdi ikki kemur til rættarfundin, er nærri ásett í § 19, stk. 3.

Eftir *stk. 3, 1. pkt.* skal Fútin sum skjótast og í seinasta lagi innan 1 viku eftir móttøku av umbønini leggja málið fyri rættin. Í málum um burturvísing skal málið tó leggjast fyri rættin innan 24 tímar, sbr. *stk. 3, 2. pkt.*

Sambært *stk. 4* hevur umbøn um at leggja málið fyri rættin ikki steðgandi virknað.

**Til § 18.**
Greinin ásetir, at ein advokatur kann tilnevnast til tann, sum krevur eina avgerð um burturvísing lagdað fyri rættin.

Í *stk. 1, 2. pkt*. verður skotið upp, at ein advokatur kann verða tilnevndur hjá tí, sum krevur avgerð um uppihaldsforboð fyri rættin, um rætturin heldur tað vera ynskiligt, tá ið hugsað verður um viðurskiftini í málinum, avleiðingina av inntrivinum, støðuna hjá kæraranum og umstøðurnar annars.

Er talan um t.d. mál, sum bera í sær ivamál ella eru um týðandi inntriv, eigur ein advokatur at verða tilnevndur. Um kærarin er ein serliga veikur persónur, kann eisini hava við sær, at advokatur verður tilnevndur. Er tað hinvegin talan um einføld og greið mál, har avmarkanin av økinum ikki er trupul, er tað vanliga ikki tørvur at tilnevna advokat. Rættarvenjan sambært § 732 í rættargangslógini um ikki skyldbundna tilnevning av verja kann brúkast vegleiðandi.

Tilnevndi advokaturin hevur somu heimildir sum ein verji í revsimálum. Um ómaksløn og endurgjald fyri útreiðslur til ein tilnevndan advokat eru somu reglur galdandi sum fyri tilnevndar verjar, sbr. § 741 í rættargangslógini.

*Stk. 2, 1. pkt.* gevur møguleika fyri undir viðgerðini av einum máli um uppihaldsforboð ella burturvísing at tilnevna órættaða ein hjálparverja. Órættaði vil sum høvuðsregla ikki vera beinleiðis uppií rættarganginum í rættinum, og tilnevning kann tí sambært ásetingini bara koma fyri í førum, har órættaði hendingaferð skal geva frágreiðing í rættinum, sbr. § 19, stk. 4.

Í fleiri førum vil tað saman við málinum um uppihaldsforboð ella burturvísing skula viðgerast eitt revsimál móti tí ágangandi partinum. Tá tað í slíkum førum sambært reglunum í kapittul 66 a í rættargangslógini verður tilnevndur ein advokatur fyri órættaða í revsimálinum, er tað ein fyritreyt, at hjálparverjin eisini kann veita órættaða ávísa hjálp í samband við viðgerðina av uppihaldsforboðs- ella burturvísingarmálinum, undir hesum vera við til avhoyringar av órættaða hjá løgregluni, sum sjálvandi vil viðvíkja báðum málum. Um avhoyring fer fram í rættinum, er tað tí óneyðugt at hava serstaka tilnevning í mun til uppihaldsforboðs- ella burturvísingarmálið. Um tilnevning av hjálparverja til órættaða í málum um tilhald o.a. kann ásetingin í § 741 a, stk. 4 um tilnevning av hjálparverja brúkast í grovum førum av tráfylging, tá tað er framt brot á eitt tilhald.

*Stk. 2, 2. pkt.* ásetir rættindini hjá hjálparverjanum í samband við viðgerðina av málum um uppihaldsforboð ella burturvísing og málsførið at taka avgerð um tilnevning. Tað er ásett at reglurnar í §§ 741 c-d í rættargangslógini om tilnevndin av hjálparverjum í samband við revsimál verða brúktar samsvarandi.

Í *3. pkt.* sæst, hvussu tað skal farast fram viðvíkjandi ómaksløn og endurgjald fyri útreiðslur til tilnevnda advokatin. Tað sæst at viðvíkjandi ómaksløn og endurgjald fyri útreiðslur til tilnevnda advokatin eru somu reglur galdandi, sum tá frí rættargongd er játtað, sbr. kapittul 31 í rættargangslógini. Tað merkir, at eins og tað er galdandi fyri ein hjálparverja eftir § 741 a í rættargangslógini, so rindar statskassin útreiðslurnar.

**Til § 19.**
Greinin ásetir, hvussu viðgerðin í rættinum av málum um uppihaldsforboð og burturvísing fer fram.

Eftir *stk. 1* avger rætturin, um málið skal viðgerast skrivliga ella munnliga.

Serkenni við uppihaldsforboðs- og burturvísingarmálum eggjar til, at tað skjótt verður tikin støða til lógargildi av inntrivinum, og tað verður tí í *stk. 2, 1. pkt.* skotið upp, at en møguligur rættarfundur verður hildin sum skjótast. Tað er ein fyritreyt, at viðgerðin av málum, sum verða viðgjørd á skrivligum grundarlagi, eisini fer fram sum skjótast. Tað er tí í *stk. 2, 2. pkt.* ásett, at rættarfundur skal vera innan 5 dagar, tá fyrstaførisavgerð um burturvísing verður løgd fyri rættin, og umbøn um at leggja avgerðina fyri rættin verður sett fram við kunngering av avgerðini. Freistin verður roknað frá móttøku av umbønini um rættarviðgerð í samband við kunngering.

Eftir *stk. 3, 1. pkt.* hevur kærarin rætt til at vera til staðar á einum møguligum rættarfundi og at siga sína hugsan, uttan so at rætturin heldur, at hetta av serligum orsøkum er nyttuleyst ella til bága hjá viðkomandi. Hetta er sama skipan, sum í § 764, stk. 2 í rættargangslógini er fyri varðhaldsfongsling, og tað er ein fyritreyt, at undantøka hevur eitt samsvarandi tepurt virkisøki.

Tað er í *stk. 3, 2. pkt.* skotið upp, at málið kann viðgerast, sjálvt um kærarin ikki er møttur. Er ein advokatur tilnevndur eftir § 18, stk. 1, kann málið tó bert viðgerast, um tann tilnevndi advokaturin er møttur, og tað ikki eru upplýsingar um lógligt forfall hjá kæraranum.

*Stk. 4* skipar prógvførsluna. Skipanin, sum er skotin upp, er samsvarandi siðvenjuni viðvíkjandi rættarfundum undir rannsakan.

Reglan merkir, at munnlig viðgerð av málunum kann vera, uttan at tað neyðturviliga er beinleiðis prógvførsla í rættinum. Um tann, sum hevur fingið uppihaldsforboð ella er burturvístur, er hjástaddur, eigur hesin at verða avhoyrdur í rættinum, men aðramáta kann málið sum høvuðsregla viðgerast á skrivligum grundalagi, undir hesum serstakliga politifrágreiðingar um eygleiðingar hjá løgregluni, frágreiðing til løgregluna frá órættaða og møguliga øðrum vitnum umframt læknaligar upplýsingar. Rætturin kann tó í serligum førum loyva vitnisførslu til brúk fyri dømingina hjá rættinum.

Avgerðin hjá rættinum verður gjørd sum úrskurður, sbr. *stk. 5, 1. pkt.* Avgerandi er, um tær settu treytirnar fyri uppihaldforboðnum ella burturvísingini í málinum, eru loknar ella ikki. Hóast talan er um eftirkanning av eini fyrisitingarligari avgerð, skal kanningin vera eins gjøllig, sum tá rætturin t.d. tekur avgerð um varðhaldsfongsling. Rætturin kann á sama hátt eftirkanna eina avgerð um tilhald eftir § 1, sum er tikin samstundis sum tann kærda avgerðin.

Er úrskurðurin eftir *stk. 5,* at uppihaldsforboð ella burturvísing verður góðkent, skal tað í úrskurðinum verða víst til tær ítøkiligu umstøðurnar, sum stuðla undir, at treytirnar eru loknar, sbr. *stk. 5, 2. pkt.*

Reglurnar eru samsvarandi galdandi fyri avgerðir um rættarliga eftirkanning av framleinging av burturvísingarfreistini.

Úrskurðurin kann kærast av ákærumyndugleikanum, tí burturvísta ella tí, sum hevur fingið upphaldsforboð, sambært vanligu reglunum um kærumál í revsirættarganginum, sbr. § 20, stk. 1.

*Stk. 6* viðger spurningin, hvør skal rinda kostnaðin í samband við mál um uppihaldsforboð og burturvísing, undir hesum serliga útreiðslurnar til tann tilnevnda advokatin. Uppskotnað skipanin hevur við sær, at tað í uppihaldsforboðs- og burturvísingarmálum ikki verður álagt tí

persóni, sum hevur fingið uppihaldsforboð ella er burturvístur, at rinda útreiðslurnar av málinum. Útreiðslurnar í burturvísingarmálum verða sostatt fyribils rindaðar av statskassanum. Um tann persónur, sum hevur fingið uppihaldsforboð ella er burturvístur, tó í einum revsimáli verður dømdur fyri brot, sum hevur ført til uppihaldsforboðið ella burturvísingina, verður útreiðslurnar í burturvísingarmálinum tiknar uppií revsimálið og verða sum høvuðsregla álagdar viðkomandi, sbr. *pkt. 1*.

Rætturin kann tó avgera, at útreiðslurnar í uppihaldsforboðs- og burturvísingarmálum í slíkum førum allíkavæl heilt ella lutvíst skulu endaliga rindast av statskassanum, um serligar umstøður í undantaksførum tala fyri hesum, sbr. *2. pkt.* Við hesum kann m.a. tryggjast, at samlaða kostnaðaravgerðin í revsimálinum er rímilig í mun til ítøkiliga úrslitið og umstøðurnar annars í revsimálinum. Í teimum førum tá rætturin ikki góðkennir eina avgerð um uppihaldsforboð ella burturvísing, skal viðkomandi ikki rinda útreiðslur hesum viðvíkjandi.

Harumframt fylgir tað av uppskotnu skipanini, at útreiðslurnar fyri uppihaldsforboðs- ella burturvísingarmálinum verður rindaðar endaliga av statskassanum í teimum førum, tá uppihaldsforboð verður givið ella burturvísing er uttan grundarlag í revsiverdum viðurskiftum, og í teimum førum, har revsimálið ikki verður framt, uttan mun til orsøkina fyri hesum.

**Til § 20.**
Eftir *stk. 1* eru reglarnar í rættargangslógini um revsirættargang fyri viðgerð av av málum um uppihaldsforboð og burturvísing í tann mun, at løgtingslógin ikki ásetir serligar reglur. Hendan almenna tilvísingin hevur m.a. við sær, at reglurnar um alment innlit og kærumál verða brúktar. Viðvíkjandi almennum innliti kann viðmerkjast, at ásetingin í § 29, stk. 1, nr. 3 í rættargangslógini um afturlatnar hurðar, um viðgerðin av málinum á einum almennum rættarfundi kann hava við sær óneyðugan ampa fyri onkran, serliga kann verða áleikandi í málum um uppihaldsforboð og burturvísing. Í § 17, stk. 3 í løgtingslógini er skotin upp ein serstøk regla um varnarting.

Viðvíkjandi rættarstøðuni hjá órættaða merkir tilvísingin, at í teimum førum tá ákærumyndugleikin ikki heldur, at tað er nøktandi grundarlag fyri at burturvísa viðkomandi, kann órættaði kæra hesa avgerðina eftir vanligu reglunum um avgerð innan revsirættargangin. Avgerðin hjá Fútanum kann sostatt kærast til ríkisadvokatin.

*Stk. 2, 1. pkt.* er ætlað at geva tí, sum inntrivið er rættað ímóti, møguleika at fáa endurgjald í teimum førum, tá avgerðin hjá ákærumyndugleikanum um uppihaldsforboð ella burturvísing vísir seg at vera ógrundað. Tílvísingin til § 1018 h í rættargangslógini hevur í fyrsta lagi við sær, at tann lætta atgongdin at fáa kravið roynt sambært kap. 93 a í rættargangslógini verður brúkt samsvarandi. Harumframt hevur uppskotið við sær, at endurgjald fyri óheimilað uppihaldsforboð ella burturvísing er grundað á vanligu endurgjaldsreglurnar í føroyskum rætti, sum serstakliga merkir, at ein fyritreyt fyri endurgjaldi er, at løgreglan hevur handlað við vilja (culpøst).

*Stk. 2, 2. pkt.* Hvat viðvíkur afturhaldi eftir § 9, er skotin upp, at reglurnar í § 1018 a í rættargangslógini, sum heimilað at tað kann krevjast endurgjald á partleysum (objektivum) grundarlagi fyri óheimilaða handtøku, samsvarandi verða brúktar, tá burturvísing ikki verður framd ella góðkend.

**Til § 21.**
Greinin hevur reglur um revsing fyri tilætlaði brot av tilhaldi eftir § 1, uppihaldsforboði eftir § 3 og forboð sum burturvísing eftir § 7.

Tað verður í *stk. 1* ásett, at tann sum tilætlað brýtur eitt tilhald eftir § 1 ella eitt forboð eftir §§ 3 ella 7, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 2 ár.

Brotsgerðin í mun til tilhald eftir § 1 er tengd at avgerðini um tilhald. Brotsgerðin er, um viðkomandi tilætlað roynir at koma í samband við tann, sum tilhaldið skal verja, uttan at sambandið av serligum orsøkum kann roknast at vera heimilað. Víst verður til viðmerkingarnar til §§ 1 og 13.

Við uppihaldsforboði eftir § 3 vil tað vera revsivert at uppihalda seg innan tað landsfrøðiliga avmarkaða økið. Víst verður til viðmerkingarnar til § 3.

Brotsgerðin í mun til burturvísing eftir § 7 er at uppihalda seg í bústaðnum, hóast tað er fráboðað avgerð um burturvísing. Tað er ein fyritreyt, at tann burturvísti eigur at hava møguleika at heinta neyðugar persónligar ognarlutir í heiminum, sum í fyrstu syftu ikki eru tiknir við, t.d. neyðugan heilivág ella lutir, sum burturvísti tørvar fyri at kunna útinna sítt starv, sbr. § 13.

Tað er ein fyritreyt fyri at revsa brot á tilhald ella forboð sambært lógini, at avgerðin er tikin av einum málsførum myndugleika og er fráboðað viðkomandi, og at avgerðin er lóglig.

Revsiramman, sum er skotin upp at vera sekt ella fongsul upp til 2 ár, samsvarar við galdandi reglur í § 265 í revsilógini um tilhald.

Revsiramman gevur møguleika fyri at ein persónur, sum ikki virðir eitt tilhald, uppihaldsforboð ella eina burturvísing, kann verða varðhaldsfongslaður eftir § 762, stk. 1 í rættargangslógini.

Metingin av brotinum á tilhald skal eins og viðvíkjandi galdandi revsilóg § 265 taka støði í núverandi siðvenju um brot á § 266 í revsilógini (um hóttanir), soleiðis sum tað sæst í viðmerkingunum til lógaruppskotið til galdandi áseting í § 265 í revsilógini.

Eftir rættarvenjuni er revsingin fyri brot á § 265 í revsilógini í fyrstaføri (fyri tilburð fyrstu ferð) sum høvuðsregla ein sekt. Um talan er um eitt stórt tal av brotum, sum hava verið sera órógvandi fyri órættaða, er tað í rættarvenjuni dømi um, at tað í fyrstaføri er dømt fongsulsrevsing. Tað sæst í *Rigsadvokatens meddelelse nr. 9/2005*, at ákæruvaldið eigur at krevja fongsulsrevsing í fyrstagangsføri, um talan er um munandi grov brot, sum kunnu hava við sær munandi ótryggleika fyri órættaða. Sambært siðvenju er høvuðsreglan við endurtøkuføri av broti av § 265 í revsilógini ein styttri fongsulsrevsing.

Revsiramman upp til 2 ára fongsul má fyri brot á tilhald metast at vera nóg mikið til eisini at rúma serliga grovum brotum ella eitt stórt tal av brotum, sum skulu dømast samtíðis. Ásetingin gevur eisini møguleika fyri at broyta revsiásetingina, serliga í samsvari við at tað frá samfelagsins síðu verður sæð meira álvarsligt upp á harðskap og ágang, serstakliga í samband við samlív. Tað er sostatt møguligt at brúka fongsulsrevsing eisini í fyrstaføri av

broti á tilhaldi, t.d. tá ónáðir líkist beinleiðis forfylging, undir hesum ikki minst føri, har viðkomandi áður hevur framt harðskap móti órættaða.

Nakað líknandi vil vera galdandi fyri brot á uppihaldsforboð og burturvísing við tí muni sum stendst av slagi av máli, undir hesum at treytirnar fyri uppihaldsforboði og burturvísing eru munandi strangari, soleiðis at tað tí alt annað líka vil vera talan um grovari ónáðir.

Tað er ein fyritreyt, at ákærumyndugleikin og dómstólarnir eru varugir við møguleikan fyri at gera frábrigdi í revsingini fyri brot á tilhald, uppihaldsforboð og burturvísing. Tað er innan galdandi revsirammu við fongsli upp til 2 ár møguligt at hava eitt fjølbroytni í revsiásetingini, sum hevur atlit at tí ítøkiliga grovleikanum í tí einkulta førinum, undir hesum eisini tað trýst, sum órættaði hevur verið fyri, og til áskoðina í samfelagnum upp á harðskap og ágang. Tað er sostatt møguligt at brúka fongsulsrevsing í grovum førum, undir hesum treytaleysa fongsulsrevsing.

Í *stk. 2* er skotið upp, at tað við áseting av revsing fyri brot á tilhald, uppihaldsforboð og burturvísing skal vera ein herðandi umstøða, at tilburðurin er liður í eini skipaðari og áhaldandi forfylging ella ágangi.

Við ásetingini verður í fyrsta lagi staðfest nágreiniliga í løgtingslógini, at tráfylging er ein herðandi umstøða við revsisásetingini. Í øðrum lagi verður samstundis ásett í løgtingslógini, hvat máliskan tráfylging merkir.

Tráfylging verður í ásetingini allýst sum "skipað og áhaldandi forfylging ella ágangur". Tað er ein treyt fyri at brúka ásetingina, at tað ella tey áleikandi brotini á tilhald, uppihaldsforboð ella burturvísing – møguliga saman við tilburðum fyrr – líkist eini slíkari tráfylging. Teir tilburður, sum kunnu vera partar í hesum sambandi, kunnu vera bæði fyrri og áleikandi tilburðir av tilhaldi, uppihaldsforboði og burturvísing, umframt brot á aðrar ásetingar, undir hesum serliga brot á húsfriðin, hóttanir, harðskap og herverk, í samband við ella sum tekin uppá eitt áleikandi brot á tilhald, uppihaldsforboð ella burturvísing. Tað er ein fyritreyt fyri ásetingini, at tað í slíkum førum sum høvuðsregla verður ásett treytaleys fongsulsrevsing.

Ásetingin í stk. 2 fevnir einans um tráfylging. Í mun til revsiásetingina hevur hendan reglan ongar avmarkingar við sær viðvíkjandi týdningin av øðrum umstøðum, sum eftir vanligu reglunum hava herðandi virknað, undir hesum endurtøkutilburðir, t.d. dómar fyrr fyri harðskap móti sama órættaða, neyvari ætlan um brot o.a. Slíkar umstøður eru eisini í tráfylgingarmálum herðandi umstøður í revsiásetingini. Við ásetingini verður staðfest, at tráfylging hoyrir heima millum teir grovu tilburðirnar av tilhaldi, uppihaldsforboði og burturvísing og hoyrir sostatt til teir tilburðir, sum eru nevndir í viðmerkingunum til stk. 1 í mun til spurningin um fongsulsrevsing.

*Stk. 3* hevur við sær, at brot eftir stk. 1 eru undir almennari lógsókn. Tað er ein treyt fyri almenna lógsókn, at órættaði biðjur um tað, uttan so at almenn atlit krevja lógsókn. Eitt líknandi slag av lógsókn er eisini í § 305 í revsilógini. Skipanin ber í sær, at tað ikki verður reist ákæra fyri minni álvarslig brot, sum órættaði ikki sjálvur ynskir at søkja at. Ein fráboðan frá órættaða verður roknað sum ein áheitan um almenna lógsókn, uttan so at nakað annað sæst í fráboðanini, sbr. § 720, stk. 2, 2. pkt. í rættargangslógini.

Máliskan *almenn atlit* er eisini í § 14. Vanliga vil tað verða somu almennu fyrilit, sum gjørdu tað neyðugt við eini avgerð um burturvísing, sum eru tey fyrilit, sum eru partar av metingini, um tað skal reisast ákæra fyri brot á avgerð um burturvísing.

Hvat tilhaldi viðvíkur hevur ásetingin við sær ta broyting, at brot á tilhald nú kemur undir treytaða almenna lógsókn og sostatt ikki longur er undir egnari lógsókn, sí revsilógina § 275, stk. 1, sbr. § 265.

**Til § 22.**
Broyting í *Brotsverksendurgjaldslógini*, sum er lov nr. 277 af 26. maj 1976 om erstatning fra staten til ofre for forbrydelser, sum sett í gildi í Føroyum við anordning nr. 470 af 25. september 1985 og broytt við lov nr. 233 af 6. juni 1985.

Broytingin í § 1, stk. 1, 1. pkt. er fyri tilhald ein fylgibroyting, av tí at reglan í § 265 í revsilógini verður flutt í hesa lógina.

Broytingin merkir eisini, at landið (Landsstýrið) eisini kann veita endurgjald og viðurgjald fyri persónsskaða, sum verður voldur við broti á uppihaldsforboð ella burturvísing, um treytirnar fyri hesum sambært kapittul 1 og 3 í brotsverksendurgjaldslógini eru loknar. Sambært galdandi rættarstøðu hevur endurgjald sambært brotsverksendurgjaldslógini einans fevnt um tilhald.

*Lógartøknilig viðmerking.* Lógin er partur av revsirættinum, sum varð yvirtikin 1. mars 2010. Men enn er nýggj løgtingslóg um endurgjald til brotsverksoffur ikki orðað, og tí er galdandi lóg framvegis á donskum.

Í *Rundskriv um uppseting og broyting av løgtingslógum og kunngerðum, um uppseting av ríkislógartilmælum og um uppseting av uppskotum til samtyktar frá landsfyrisitingini* frá 10. februar 2015 stendur í nr. 2.1.7 soleiðis: "Tá ið broytingar skulu gerast í ein galdandi danskan tekst, skulu broytingarnar orðast á føroyskum. Einstøk føroysk orð skulu ikki setast inn í danska tekstin. Heldur eigur í minsta lagi alt stykkið ella øll greinin, ið skal broytast, at verða orðað av nýggjum."

Tí er skotið upp at orðað § 1, stk. 1 av nýggjum, hóast broytingin einans er, at løgtingslóg um tilhald, uppihaldsforboð ella burturvísing verður sett inn í § 1, stk. 1, 1. pkt.

**Til § 23.**
Gildiskoma. Sambært uppskotinum skal lógin skal koma í gildi 1. januar 2017.

Lógin hevur gildi fyri brot, sum eru framd aftan á, at lógin er komin í gildi.

Løgmansskrivstovan, dagf.

**Aksel V. Johannesen**
løgmaður

/ Marjun Hanusardóttir

Fylgiskjøl til lógaruppskoti

1) Justitsministeriets cirkulæreskrivelse nr. 11075 af 12. februar 1990 om behandling af sager om meddelelse af advarsler i henhold til straffelovens § 265.
2) Strafferetsplejeudvalgets betænkning nr. 1526/2011 om tilhold, opholdsforbud og bortvisning
3) Ummælir